# FFblaðið

BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 329 Hósdagur 5. november 2004 12,-


Síða 2



## Sámal Jákup farin í land

Aftaná 50 ár á sjónum er Sámal Jákup givin.


**KÄRCHER**



Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til idnað.

Vit umvæla eisini

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagota 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42


## 100 ár síðan fyrsta Gøtuskipið fórst

Tað gekk illa hjá fyrstu gøtumonnum, sum fingu sær skip.

Síða 6




**100% tryggleika?**



**Tí velja fleiri og fleiri maskinmeistarar Mobil smyrjiolju!**

petur & petur • 320870

Mobil Oil Føroyar

Mobil Oil Føroyar
Mykinesgøta 8, Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 319354 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo


## Fóru til Íslands fyri 50 árum síðani



Síða 11

## Eisini kreppa hjá fiskimonnum í Norðurírlandi

Fiskimenn í Norðurírlandi søkja sær ráð í Føroyum

Síða 20

## Lisa við Keldu um læknakynstur í Mikladali:

Marin uppi í tungu hevði "privathospital".

Síða 9


**Vit selja DAEWOO bátamotorar**

**frá 70 hk til 1.000 hk**



DAEWOO

Umboð: Thorleif Samuelsen
Undir Gráasteini 68 · Tórshavn
Tlf: 31 77 13 · Fartlf: 28 31 38
E-mail: thorsam@post.olivant.fo


## Minningarhald á Sjómans-heiminum

Baksíðan



## Framleiðsla av salti

Vit lýsa hvussu salt verður framleitt.

Síða 12

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

FF-blaðið: Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
Útgevari: Føroya Fiskimannafelag

Blaðstjóri: Óli Jacobsen
Layout: Føroya Fiskimannafelag
Prenttilgerð: Føroya Fiskimannafelag
Prent: Prentmiðstøðin

Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin

- kemur út annanhvønn hósdag

Sjómaður fer í land:

# Sámal Jákup hevur stungið í sekkin!

**Seinasta sunnukvøld fór Sámal Jákup Hansen seinastu ferð í land av "Dúgvuni" sum skipari. Hann er fallin fyri 67 ára aldursmarkinum. Hervið er eitt drúgvt skeið á sjónum komið at enda. Eisini er ein av "sjarmunum" við at sigla um Leirvíksfjørð farin. Tí tað var ein serligur hugni at kunna fara uppá brúnna, tá siglt varð millum Klaksvík og Leirvík at fáa sær eitt prát við henda fyrikomandi mannin, sum visti so nógv at fortelja.**



*Sámal Jákup er júst fyltur 67 ár, og hetta merkir at nú nærkast seinasta túri.*

Sámal Jákup hevur í útvarpinum greitt frá sínum lívi á sjónum. Í stuttum hevur hann siglt við trolarum sum heilt ungur. Hann fór á sjómansskúla í Danmark og fekk sær eisini seinni navigatørútbúgving. Hann sigldi nógv ár við tí fyrsta Kosangas skipinum, og var einaferð í vanda fyri at verða sprongdur í luftina av gassleka.

Men hann hevur eisini verið í eini sera dramatiskari hending við fiskiskipi. Hetta var í 1954 við "Bóndanum" (Jóannes Patursson) við Hans Paula Johannesen sum skipara. Teir fiskaðu uppi á Halanum, sum er út fyri Vestfirðum í Íslandi, og sum er eitt tiltikið ringt pláss til veður. Ein dagin teir fiska í góðum veðri, gevur Hans Pauli boð um at hála trolið inn og at skálka alt til sum kundi skálkast til. Hetta var heilt ónátúrligt, men frágreiðingin var, at Hans Pauli nakað langt burturi í havsbrúnni hevði sæð eitthvørt, sum líktist einum skýggi og sum bert kundi vera eitt øgiliga stórt brot, sum nærkaðist. Tí ráddi um at sleppa sær til lands sum skjótast. Og hetta gjørdist eisini eitt øgiligt illveður við kavaroki og yvirísing av skipinum. Hans Pauli skrivar, at hann ikki nakrantíð hevði sæð slíkar aldur. "Sjúrðarberg" við Kaj Johannesen sum skipara var eisini í farvatninum. Veðrið var so ringt, at tveir enskir trolarar við meira enn 40 monnum umborð gingu burtur, so hetta er ein ferð, sum seint verður gloymd.

Síðani seinast í 1970 hevur Sámal Jákup siglt við Strandferðsluni, tá hann fór umborð á "Pride". Og tað er nærum ikki tann leið, har hann ikki hevur siglt. M.a. var hann í Karibien við "Teistanum" og hann hevur siglt í Álandi við sama skipi. Hann heldur eisini enn, at tað var ófyrigeviligt at selja tað vala skipið, sum "Teistin" var.

### Náttúrueygleiðari

Sámal Jákup er eisini náttúrueygleiðari av teimum fáu. Vit høvdu fyri trimum árum síðani eina grein um hansara upplivingar um Leirvíksfjørð, har hann hevur siglt túsindir av ferðum.

Her kundi hann fleiri ferðir um dagin síggja, hvussu fuglalívið í fjørðinum var ein bardagi við lív og deyð. Hann greiddi frá, tá ein ávísur skúgvur fekk sær eina máltíð tríggjar ferðir um dagin, og at tað hvørja ferð var havhestur, sum var á matarseðlinum. Havhestur flýgur ímóti vindinum, so skúgvurin fer so spakuliga flúgvandi aftan á havhestinum, og knappliga leggur hann á. Hann setur klørnar í havhestin, og ger skjótt av. Tað ræður um at sleppa honum niður ímóti sjónum, og so at halda havhestinum undir, til hann er druknaður, og tá er borðreitt!

Ein dagin sá Sámal Jákup eina likku, sum var farin í holt við ein lunda. Sjálvt um lundi er nógv minni enn likka, so var lundin ikki so at koma í holt við. Hann bardist manniliga fyri lívinum, og likkan fekk eina mótstøðu, sum hon ikki hevði roknað við. Lundin kundi soleiðis lættliga havt klipt nevið av likkuni, um hann kom soleiðis fyri, og so var likkan ikki nógv verd. Men Sámal Jákup sá ikki, hvør ið gjørdist vinnari.

Annars hevur Sámal Jákup havt eina likku sum "húsdjór". Hon var komin at halda til á grundini hjá teimum. Tey byrjaðu at geva henni at eta, og skjótt føldi hon seg heima, og var eisini skjótt væl gødd. Eina ferð vóru tey bæði Sámal Jákup og konan burtur í fleiri mánaðir. Tey roknaðu við, at nú mundi likkan hava gloymt tey, men so var ikki. Heimafturkomin bíðaði likkan eftir teimum. Likka er annars ikki ein "populerur" fuglur, men tað man vera sum við menniskjum, at okkurt gott býr í øllum. Ein dagin sær Sámal Jákup ein kjógva, sum er farin í holt við eina likku. Tað eydnaðist likkuni at sleppa undan, men tá sær Sámal Jákup fýra ternur, sum eru eftir kjógvanum, og við so nógvum fíggindum er bert eitt at gera, og tað er at sleppa sær til rýmingar.

Nú fær Sámal Jákup góða tíð at eygleiða tað, sum hendir í náttúruni og annars at røkja øll sín áhugamál, og vit ynskja honum góða eydnu.

*ó.*

100% tryggleika?



Tí velja
fleiri og fleiri
maskinmeistarar
Mobil smyrjiolju!

petur & petur • 320870

Mobil Oil Føroyar

Mobil Oil Føroyar
Mykinesgøta 8, Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 319354 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo

Umvælingar av bátum



Einasta góðkenda glasfiburbátasmiðjan í Føroyum.

Alt glasfiburarbeiði verður gjørt í góðkendum verkstaði.

Alt umvælingararbeiði á einum staði: leingjan av bátum, søla og íseting av motorum, - og so hava vit teir sera væl umtóktu slengrikjølarnar.

Ring ella kom inn á gólvið.

Ein góð tænasta!
AWI BOATS SERVICE SP/F
Rókahavnin 10 · FO-620 Runavík
Tel 448585 · Fartel 218585 · Fax 448785
awi@post.olivant.fo · awi.fo

## Komandi blað

Vit hava ein hóp av tilfari eftir til komandi blað. M.a. er frásøgn frá tí hálva føroyinginum Knud Andersen, sonur Gunhild á Rógvi, úr Vestmanna. Hann hevur eina spennandi bakgrund. Hann er gitin í Moskva beint undan krígnum, og mamman kom til Danmarkar at eiga hann beint áðrenn Hitler legði á Sovjet. Hann er nú forsprákari fyri eini umhvørvisligari fiskiveiðu og er við í eini verkætlan at veiða skrubbum í Aralvatninum í Kasakstan.

Vit hava seinasta part av áhugaverdu søguni hjá Lisu við Keldu, har hon m.a. greiðir frá hvussu tað rann saman við mannin Eliseus, og um tá hann var við Ernestine lagnutúrin í 1930.

Helst verður eisini nýtt at frætta um umskipanina av fiskamarknaðinum, sum fyrr hevur verið umrødd í blaðnum.

Ráðini frá skotskum fiskimonnum til norskar fiskimenn:

# "Haldið tykkum uttanfyri ES"!

**Mike Park er leiðari fyri størsta fiskiveiðifelagið í Skotlandi, The Scottish White Fish Producers Association. Park umboðar 250 fiskifør, og hevur tey seinastu 10 árini ofta verið í Bruxelles til tess at verja áhugamálini hjá skotskum fiskimonnum.**

Hann var eisini gestur á ráðstevnuni í Tromsø, har hann ávaraði norskar fiskimenn í móti limaskapi í ES. Hann sigur, at norðmenn sigast at hava trupulleikar av at vera uttan fyri ES. Men tað eru so sanniliga eisini trupulleikar at vera innan fyri felagsskapin. Áðrenn Noregi yvirhøvur hugsar um at fara inn í ES, mugu teir tryggja sær ræði á fiskatilfeinginum. "Hví skulu tit lata revar ansa hønsunum? Hugsið um framtíðina og komandi ættarliðini".

At fáa ræði á egnum tilfeingi er ómøguligt sambært galdandi reglum. Allur avgerðarrættur liggur í Bruxelles, og hetta er eisini ásett í uppskotinum til ES-grundlóg. Skotski tjóðskaparflokkurin hevur uttan úrslit skotið upp, at fiskivinnupolitikkurin verður tikin burtur úr ES-felagspolitikkinum, soleiðis sum Park kundu hugsa sær. Men hetta er órealistiskt váttar Park, og tað verður ikki í bræði, at hetta verður gjørt.

Hann verður eisini spurdur, um orsøkin til hansara støðu er tann, at skotar vilja sleppa at oyða egnar fiskastovnar. Men tað er als ikki tað, talan er um. Hann vísir á, at tað er fyrst og fremst ES fyri at takka, at støðan er blivin so vánalig. Teir góvu upprunaliga studning til at uppbyggja fiskiflotan, og úrslitið varð í fyrsta umfari ein stór øking í flotanum. Men eftir fáum árum hava teir tikið 60% av veiðiorkuni burtur. Skotar nýta trol við 120 mm meskavídd móti 80 mm aðra staðni í ES. Teir kunnu vera úti í 15 dagar um mánaðin, meðan fiskimenn í øðrum ES londum, sum nýta smærri meskavíddir, fáa 8 dagar eyka. Tí meta skotskir fiskimenn, at mismunur verður gjørdur. Hvussu nógv flotin er minkaður kann m.a. síggjast í Aberdeen, sum einaferð varð ein stórur fiskivinnubýur, har fyrr vóru 100 fiskiskip. Nú eru bert 3 eftir.



*Mike Park hevur ringar royndir av ES.*



*Tað sama hevur ES-tinglimurin Paulo Cacaka frá Assorunum.*

Annars er tað fyrst og fremst toskaveiðan, sum er hótt í Norðsjónum. Hýsustovnurin hevur ongantíð verið størri enn tað sama. Men tá toskaveiðan skal avmarkast, merkist hetta eisini fyri hýsuveiðuna, tá hesi bæði fiskasløgini verða veidd saman.

Annars heldur Park, at fiskiveiðan í ES er alt ov nógv merkt av, at alt skal revsast, heldur enn at hava eina skipan, har tað verða givin herðaklapp fyri at bera seg skynsamliga at.

### Assorurnar mist sína heimild

Eitt annað umboð á ráðstevnuni var Paulo Cacaka, úr Assorunum og limur í Evropatinginum. Hann er sera illur nøgdur við, at ES hevur yvirtikið eftirlitið av sárbarum fiskastovnum kring Assorurnar, t.d. búrfiskastovnin, sum teir halda vera eitt hótt fiskaslag. ES hevur tikið av tær reglurnar, sum vóru gjørdar av lokalu myndugleikunum, og sum rukku út á 100 fjórðingar: Hesar reglur góvu teimum møguleika at taka stig til at seta tiltøk í verk at verja fisk móti ovur veiðu.

Paulo Cacaka vil fegin berjast í móti uppskotinum í ES-grundlógini um, at allir fiskivinnuspurningar skulu avgerast í Bruxelles. Hann sigur: "Lat okkum allar innan fyri og uttan fyri ES siga: "Nei, vit góðkenna ikki hendan partin í nýggju grundlógini"." Hetta vil samstundis merkja, at lond sum Ísland og Noregi fara at halda seg uttan fyri ES.

Við slíkum niðurstøðum frá umboðum innan fiskivinnuna í ES, hevur norska mótstøðan móti ES, serliga innan fiskivinnuna, fingið góð kort í hondina.

FF-blaðið www.fiskimannafelag.fo

Gerst haldari fyri einans 50 krónur um ársfjórðingin

## Sýsluformansval

Hvørt ár er val í Føroya Fiskimannafelag. Triðja hvørt ár er ávikavist felagsformansval, sýsluformansval og sóknarformansval. Nú í heyst verður sýsluformansval. Um hetta sigur lóg felagsins:

> *Felagið verður stjórnað av eini felagsstjórn, sum hevur sjey limir, og eru teir felagsformaður og seks sýsluformenn. Ein sýsluformaður verður valdur fyri hvørja sýslu ... og felagsformaðurin verður valdur millum allar limirnar. Valini eru beinleiðis val. Tveir tiltaksmenn verða valdir fyri hvønn sýsluformann ... Har (slíkir) vænta, verða sóknarformenn í teimum størstu sóknunum í sýsluni tiltaksmenn.*

Um uppstilling verður sagt:
Við val av felags- og sýsluformonum hevur hvør sókn rætt til at stilla upp ein mann.

Um val verður sagt:
Valini eru loynilig og fara fram eftir reglum, sum felagsstjórnin ásetur. Atkvøðuseðlarnir verða sendir til grannskoðara felagsins, sum telur atkvøðurnar upp.

Annars eru hesar reglur galdandi fyri sýsluformansvalið:

1. Uppstillingin fer fram frá 1. november til 2. desember. Felagsstjórnin skal hava boð um uppstilling í seinasta lagi 3. desember kl. 16.
2. Valið fer fram frá 15. desember, og atkvøðuseðlarnir verða upptaldir 1. februar 2005.
3. Valrætt hava teir fiskimenn, sum
   a. hava goldið limagjald fyri 2003/2004.
   b. í 2004 hava verið mynstraðir og avroknaðir eftir sáttmála millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag, tó undantikið skiparar. Limir í sjómannadeildini hava atkvøðurætt.
4. Felagsskrivstovan sendir áðrenn valið sóknarformonnum yvirlit yvir limir í sóknini.
5. Á atkvøðuseðlinum verða prentað nøvnini á valevnum, og skal hann koyrast í ein brævbjálva. Aftanfyri á brævbjálvanum skal skrivast navn, bústaður, føðingardagur, og seinasta skip og tíðarskeið viðkomandi hevur verið við. Brævbjálvin skal sendast beinleiðis til grannskoðara felagsins, soleiðis at móttakarin rindar postgjaldið.
6. Sóknarformenninir skipa fyri valinum, soleiðis at teir býta atkvøðuseðlarnar út til limirnar, og so vítt gjørligt heinta teir aftur. Í sóknum har tað av praktiskum orsøkum ikki ber til at nýta hesa mannagongd, verða atkvøðuseðlarnir sendir beinleiðis til limirnar við postinum.
7. Har sóknarformenn skipa fyri valinum, er samsýningin kr. 7 pr. lim í sóknini.
8. Atkvøðuseðlar skulu vera grannskoðara felagsins í hendi í seinasta lagi 30. januar.
9. Mannagongdin verður lýst í FF-blaðnum.

Verandi sýsluformenn eru:
Fyri Norðoyggjar: Fríðrik Sivertsen, Viðareiði.
Fyri Eysturoy: Eyðun Johannesen, Oyrarbakki
Fyri Streymoy: Karl Isaksen, Kvívík
Fyri Sandoy: Sigmund Hentze, Sandur
Fyri Vágar: Andreas Berglíð, Sørvágur
Fyri Suðuroy: Sámal Poulsen, Sandvík.

# Norskir fiskimenn siga (framvegis) nei til ES

## Í døgunum 15. - 17. oktober 2004 skipaði norska felagið "Nei til EU" fyri ein ráðstevnu í Tromsø.

Evnið á ráðstevnuni var: *Nasjonal fiskeriforvaltning, med sideblikk på (eventuelt) EU-medlemsskap: Sett fra henholdsvis Island, Færøyane, Danmark, Skotland.*

Fyrilestrahaldararnir vóru úr umrøddu londum. Óli Jacobsen umboðaði Føroyar, og hansara upplegg varð prentað í seinasta blaði. Í blaðnum í dag hava vit ein samandrátt av tí, sum umboðini fyri hini londini bóru fram. Tað sæst skilliga, at her var ikki nógv, sum talaði fyri ES limaskapi.

ES limaskapur hevur í nógv ár verið eitt sera heitt evni í Noregi. Tvær fólkaatkvøður hava verið um spurningin.Tann fyrra var í 1972, tá ein tepur meiriluti segði nei til ES. Tað stóð hart á.Tað sigst, at orðaskiftið var so kensluborið, at tað hendi, at hjún fóru frá hvør øðrum, tí tey høvdu hvør sína hugsan um hetta málið. Mótstøðan var serliga stór í Norðurnoregi, har fólkið ræddist fiskivinnupolitikkin hjá ES. Eisini "djórið í Opinberingini", sum nógv – eins og í Føroyum – hildu mátti vera ES, spældi sín leiklut í orðaskiftinum.

Í 1994 var aftur fólkaatkvøða, og úrslitið var tað sama. Síðani tá hava meiningakannningar víst, at tað javnvigar frá kanning til kanning, hvørja støðu fólk hava.

### Fiskimenn farnir í tvíningar

Hetta var grundgevingin fyri at hava ráðstevnuna. Kanska eisini tí, at tað mest eru fiskimenn í Norðurnoregi, sum eru ímóti at fara upp i ES. Hesir kenna seg meira hóttar enn fiskimenninir sunnanfyri, t.d. teir á Ålesund leiðini. Fiskimenn eru nevniliga eisini í tvíningum á øðrum økjum. Tað er í veruleikanum eitt standandi stríð um, hvørt fiskurin, og serliga toskurin, skal veiðast av smábátum, sum landa hann til virkini á landi, ella hann skal veiðast av størri førum, t.d. frystitrolarum og línuskipum, ið virka fiskin umborð. Teir, sum hava hesi seinnu áhugamálini, eru fyri mesta partin heimahoyrandi í sunnara partinum av Noregi. Hetta merkir so eisini, at Noregs Fiskerlag, sum umboðar bæði fiskimenn og reiðarar, javnan hevur verið um at fara í tvíningar. Og nú er tað hent, at strandafiskimenn í Norðurnoregi hava stovnað Norges Kystfiskerlag, sum berjist sum úlvur á skóg fyri áhugamálunum hjá útróðrarmonnum. Hesin felagsskapurin tykist eisini støðugt at vaksa.

Hetta hendir samstundis sum fiskivinnan í Norðurnoreg er hótt, meðan fiskivinnan har suðuri hevur tað heilt gott. Ikki minst er hetta galdandi fyri øll kraftblokkaskipini.

Serliga er tað fiskiídnaðurin í Norðurnoregi, sum er hóttur – einamest av Kina. Ein stórur partur av toskinum, sum verður heilfrystur umborð, og sum eins væl kundi verið landaður í Noregi til víðari virking, verður sendur til Kina at virka.

Fyri kortum umrøddu vit eina framløgu hjá Egil Olsen, har hann vísti á, hvussu lønandi hetta kundi vera. Og hetta merkja flakafólkini í Norðurnoregi nógv til. Eitt annað er, at russarafiskurin, sum gav eitt gott ískoyti til flakavirkini, er so gott sum burtur. Men hetta er partvíst at takka fiskivinnukapitalistunum í Suðurnoregi fyri, tá teir nú gera íløgur í russisku fiskivinnuna, so fiskurin kann verða arbeiddur av russum, ið fáa munandi lægri løn enn norsku arbeiðsfólkini. Hetta er gott fyri russar men ikki fyri norðmenn!

Soleiðis er talan um mótstríðandi áhugamál uppá "kryds og tværs". Men fólkið norðanfyri tykist at verða samt um at verja "Kystnorge". Og tað eru ikki beri fiskimenninir, sum gera bart. Júst nú er eitt átak "Kysten til Kamp", og her eru tað fiskimannakonur í Lofoten, sum skipa fyri.

Fríggjadagurin og leygardagurin á ráðstevnuni fóru fyrst og fremst til at útgreina støðuna í londunum uttanfyri ES. Leygardagin var tó eisini eitt umboð fyri eina rørslu, sum vildi sleppa inn í ES, sum hevði eitt upplegg. Tað var nú meira teoretiskt og virkaði ikki serliga sannførandi. Tíbetur fyri tann unga mannin, sum legði fram, var tíðin sera knøpp. Annars høvdu teir gomlu garvaðu mótstøðumenninir, sum vóru á ráðstevnuni, smurt hann av.

### Peter Ørebech: Eisini vinnuligir fyrimunir at vera uttanfyri

Sunnudagin vóru serliga tvær framløgur, sum eru verdar at nevna. Tann fyrra var framløgan hjá Peter Ørebech, frá Norges Fiskerihøjskole í Tromsø. Hann hevur havt nógvar føroyingar sum næmingar, tí fyri nøkrum árum síðani var tað sera væl umtókt hjá ungum fiskivinnuáhugaðum føroyingum at taka fiskivinnuútbúgving í Tromsø.

Framløgan hjá Peter Ørebech var sera ítøkilig. Hann vísti aftur nógvar av teimum handilsligu og vinnuligu grundgevingunum, sum verða brúktar fyri at tala fyri at fara inn í ES. Eitt dømi var, at útflutningstølini fyri norskan markel vístu munandi størri tøl enn støddina á kvotunum hjá Noregi. Tá tað síðani varð kannað, vísti tað seg, at írar, sum eru limir í ES, høvdu landað ein hóp av makreli í Noregi, fyri at sleppa undan at gjalda toll. Tað gera teir, tá teir landa til eitt ikki-ES land, hóast makrelurin endar í ES. Hetta er aftur eitt dømi um, at tað loysir seg eisini handilsliga at vera uttan fyri ES. Her skal skoytast uppí, at tað er alment kent, at írar veiða fleiri ferðir sína kvotu av makreli. Hetta kann nú eisini vera orsøkin til, at teir vilja landa í einum landi uttan ES-eftirlit.

Peter Ørebech hevði eisini eitt annað dømi og tað var, at danskir vinnulívsmenn byggja virkir í Noregi, sum skulu virka ta sildina, sum tað annars skuldi verið náttúrligt at virka í Danmark. Men her er orsøkin helst tann, at tollurin á virkaðum vørum er lægri enn á heilum fiski, og tí loysir tað seg at virka fiskin í Noregi og at geva norðmonnum tey arbeiðsplássini heldur enn dønum.

"Spøkilsi" hjá ES er felags fiskivinnupolitikkurin, sum nú er útsettur til ár 2013.

Men sjálvt um fiskivinnupolitikkurin er útsettur í 10 ár afturat, óttast Peter veruliga fyri, at spaniólar eru í fer við at troðka seg inn í Norðsjógvin. Sum kunnugt er hitin broyttur í sjónum á hesum leiðum, og hetta merkir, at fiskasløg, sum annars vanliga verða veidd sunnarlaga, har spaniólar og portugisar veiða, er við at koma norðureftir í Norðsjógvin. Her fara spaniólar at gera krav upp á, at hetta er fiskur, sum teir "eiga", og sum teir tí eisini mugu sleppa at fiska.

Hetta kunnu teir t.d.



*So nógv sjóøki eigur Noreg.*


*Svein Johansen er ein gomul útróðrarkempa. Beint nú fyrireikar hann eitt rættarmál móti statinum fyri at fáa staðfest, at rætturin at veiða eigur at vera ein rættur fyri øll.*


*Peter Ørebech.*


*Ottar Brox.*

gera við sokallaðari kvotahopping. Spaniólar kunnu skráseta síni skip í Bretlandi og síðani veiða bretskar kvotur. Teirra rættur til hetta er júst staðfestur við einum dómi.

### Val millum fólkaræði og serfrøði

Ottar Brox, sum eisini er kendur í Føroyum, hevði síðani eina framløgu. Ottar hevur alt lívið verið ein partur av norska kjakinum. Fyri nærum 40 árum síðani skrivaði hann bókina **Hva skjer i Nord-norge**. Bókin er um lagnuna hjá bygdunum. Z. Wang hevur týtt bókina til føroyskt og givið hana út.

Í Noregi hendir á leið tað sama, sum hendir við bygdunum í Føroyum. Tá vegur er komin til eina bygd, er t.d. grundarlagið burtur at hava handil í bygdini, tí grannabygdirnar hava fleiri handlar, og sum frá líður gerst tað kanska eisini lættari at flyta!

Ottar Brox metir málið um norskan limaskap í ES sum ein spurning millum fólkaræði og serfrøðingaveldi. Hansara áskoðan er, at um norska lóggávutingið ger nakað, sum teir seinni ásanna er skeivt, so kann stórtingið rætta tað aftur.

Men tað, sum ES einaferð hevur samtykt, ber stórt sæð ikki til at broyta aftur. Tað vísa allar royndir.

Hetta eru viðurskifti, sum ikki minst eru galdandi fyri fiskimenn og fiskivinnu. Eitt, sum hann ber ótta fyri, er tann serliga norska Råfiskloven, sum stavar frá 30-unum, og sum verður roknað fyri at vera "fiskernes grundlov", sum eingin skal sleppa at nerta við. Grundarlagið fyri hesi lóg er, at tað eru fiskimenn sjálvir sum gjøgnum sítt "råfisklag", bjóða fiskin út, og sum eisini kunnu áseta prísin á fiskinum, um tað ikki verður semja við fiskakeyparar um hann.

Í dag eru ymsar meiningar í Noregi um tørvin á hesi lóg, men við ES limaskapi kemur henda lógin at detta burtur. Hetta fer at merkja færri fiskakeyparar, og hetta fer eisini at hava ávirkan á eftirspurningin eftir fiski og tískil eisini ávirkan á prísirnar. Tað, sum telur her, er eisini, at ES-reglurnar eru sera ólagaligar. Við hesum reglum kann eisini roknast við, at virki kunnu verða stongd orsakað av smálutum, sum t.d. at eitt WC ikki er nóg langt frá innhurðini og annað tílíkt. Minni av fiski fer tá at koma upp á land, og enn minni av arbeiði verður til arbeiðsfólkið.

Tað, sum telur nógv hjá Ottar Brox er tað, sum er komið fram á hesi ráðstevnuni, nevniliga, at teir, sum eru inni vilja út!

Vit hava á henda hátt roynt at lýst hesa ráðstevnuna, so hon eisini kann vera grundarlag hjá føroyingum og føroyskum fiskimonnum at viðgera hendan so avgerandi spurning um okkara framtíðarviðurskifti við ES.

## Fiskimenn!

### Minnist til freistirnar, tá søkt verður sjúkraviðbót.

Tá søkt verður sjúkraviðbót til Lønjavningarstovuna eiga fiskimenn at minnast til tær freistir sum eru samb. nýggju lógini um sjúkraviðbót. Onnur er, at teir skulu søkja lækna í seinasta lagi eftir heimkomu, tá viðkomandi fer sjúkur í land.

Hin er at umsóknin skal verða inn latin aftur í seinasta lagi 60 dagar eftir at fiskimaður er komin heim av túri.

Hesar freistir bæði kunnu og skulu haldast.

## Hjálpargrunnurin

### fyri óarbeiðsførar fiskimenn

Umsóknarbløð til grunnin fáast við at skriva til: **Postboks 2114, FO-165 Argir,** ella at ringja á tlf. 31 60 89 (svarar eftir arbeiðstíð) ella leggja boð á telefonsvararan.

***Umsóknir til hjálpargrunnin mugu vera grunninum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 10. desember 2004.***

Hjálpargrunnurin

# Ísland neyvan inn í ES fyribils

### Íslendska umboðið á ráðstevnini í Tromsø var Ingolfur Arnarson frá lærda háskúlanum í Reykjavík.

Hann segði, at 70% av íslendska útflutninginum fór til ES. Hann segði m.a., at tann parturin av íslendska útflutninginum, sum er fiskur og fiskavørur, liggur um 63% av vøruútflutninginum ella 40% av øllum útflutninginum. Eisini segði hann, at 30% av íslendsku fiskiveiðuni er heilt ella partvíst uttan fyri íslendskt sjóøki. Her kann skoytast uppí, at íslendingar kunnu fiska í øðrum sjóøki uttan at lata nakað afturfyri. Hetta sigur eitt sindur um, hvussu væl Ísland er fyri í mun til Føroyar.

Ingolfur greiddi frá íslendsku kvotaskipanini, sum er væl kend í Føroyum. Tað løgna er, at henda skipan hevur eina dygga undirtøku millum íslendskar politikkarar og fiskivinnuna, men kanningar vísa, at 70% av fólkinum eru ímóti skipanini.

Íslendingar royna at "selja" sína skipan sum heimsins bestu. Men hóast hetta kundi Ingolfur greiða frá, at samfelagsliga úrtøkan av fiskiveiðuni undir Íslandi er ikki økt síðan ár 2000. Men hinvegin eru stór virði flutt frá "fólkinum" til einstaklingar. Hetta hevur eisini havt stóra ávirkan á bygdasamfeløgini í Íslandi, sum fyri ein stóran part hava mist sítt lívsgrundarlag, tí kvoturnar eru seldar til tey størru plássini.

Tosað varð eisini um støðuna hjá teimum smærru bátunum í Íslandi. Upprunaliga var ætlanin, at hesir skuldu fiska frítt, á sama háa sum ta eisini er upp á tal í Føroyum. Men tá kom ferð á at effektivisera júst hendan partin av flotanum. Menn fingu sær speedbátar, og teirra partur av toskaveiðuni fleirfaldaðist. Nú eru smábátarnir, trillurnar, undir eini dagaskipan, sum avmarkar møguleikarnar sera nógv.



*Ingolfur Arnarson. Hann ivast í um Ísland hevur nógv at vinna í ES.*

### Spurningurin um ES

Spurningurin um íslendskan limaskap í ES hevur ofta verið frammi í Íslandi. Meiningakanningar hava eisini onkuntíð víst eina stóra undirtøku og enntá meiriluta fyri limaskapi.

Men avgerðin um limaskap er nógv tengd at, hvørjar treytirnar vera. Ein avgjørd treyt er, at Ísland sjálvt krevur at sleppa at umsita sítt egna fiskatilfeingi. Teir vilja fyri alt í verðini ikki lata hesa umsiting til Bruxelles. Eitt annað íslendsk krav er, at teir í høvuðsheitum skulu eiga sín egna fiskiíidnað. Men alt hetta krevur grundleggjandi broytingar í ES-grundlógini. Tað verður ikki roknað við, at tær broytingarnar verða gjørdar í bræði.

Ingolfur reisti spurningin um, hvørji áhugamál Ísland hevur við at fara upp í ES. Hann sigur, at kanningar vísa, at búskaparliga er einki at vinna. Hinvegin kemur limaskapur at kosta limagjald. Tað ber til at fáa nýggjar marknaðir í ES við limaskapi, men tað kann neyvan náast meira enn longu er nátt við limaskapinum í EFTA. Eisini verður ávirkanin sera avmarkað. Íslendska fólkatalið í mun til samlaða talið á ES-borgarum er 1:1700! Men tað er givið, at Ísland fær trupulleikar, um Noreg fer inn í ES. Stendur tað til fundarfólkið í Tromsø, so er eingin vandi fyri at tað hendir!



Sorgarleikur fyri 100 árum síðani:

# Tá Tulip – fyrsta fiskiskipið í Gøtu – fórst á veg úr Hetlandi til Føroya í nov. 1904

**Hendan greinin stóð í Dimmalæting í 1984, tá 80 ár vóru liðin síðan Tulip fórst. Vit endurgeva greinina bert við teirri tillaging, at tað nú eru 100 ár farin. Tað var Gøtu Fornminnisfelag, sum stóð fyri greinini. Formaðurin Arnleyg Jacobsen, sum var tiltikin søgukøn, er síðani deyð.**

Í ár eru 100 ár liðin, síðani Gøtumenn keyptu fyrsta skipið til bygdina. Skipið æt "Tulip". Men eydnan var ikki við hesum monnum, tí longu sama heystið – í 1904 – gekk skipið burtur. Við skipinum vóru 6 mans, ið allir vóru eigarar.

Hetta var av sonnum ein dyggur smeitur fyri bygdina, og serliga svárt, tá hugsað verður um, at bert 1½ ár frammanundan – í mars 1903 – fórust 6 ungir Gøtumenn við vágssluppini "Cyclone", ið fiskaði úti á Bankanum, og sum ikki spurdist afturíaftur hetta várið, hóast veðrið sigst at hava verið gott – gitt hevur verið, at hon kann hava verið ásigld.

100 ár er long tíð, og tí er eingin eftir, ið minnist henda sorgarleik við "Tulip" – Gøtu fyrsta skipi.

Tað hevur tí verið roynt at kanna, hvat ið finnast kann av skrivligum tilfari, og hvat gomul fólk vistu at siga um hetta skipið og um menninar, ið fórust við tí.

Tað verður fortalt, at tað var um várið 1904, at 6 ungir menn fóru niður til Hetlands at hyggja sær eftir einum skipi.

Menninir vóru: Hans og Petur Jacob Hansen **hjá Glyvra-Hanusi**, Sámal Petur Joensen **á Brúnni**, Joen Pauli Poulsen, vanliga nevndur Palli **í Pollaliða**, allir úr Norðragøtu, Símun Petur Olsen í **Mikkjalstoft** við Gøtugjógv og Carl Fr. Olsen **av Heimbø** í Søldarfirði.



*Sigfríður Joensen hevur sjálvur verið í Lerwick og funnið fram skjøl um Tulip.*

Í Lerwick komu teir fram á "Tulip", ið var lítil slupp, 64,5 fót long, 17,8 fót breið og 8,9 fót djúp, máld til 43,94 registertons. Prísurin var kr. 4.000,-, tá var eitt nýtt stórsegl við.

Tað verður eisini sagt, at teir komu til Føroya við skipinum fyri páskir (t.v.s. í mars 1904), og eftir páskir, tá teir vóru lidnir at rigga til, varð farið út undir Føroyar at royna.

Undir Føroyum royndu teir í 12 vikur, fingu 88 skippund, sum teir seldu fyri kr. 3.405,72 – við vóru 13 mans.

Eftir Ólavsøku varð farið til Íslands – nú vóru 14 mans við skipinum. Har royndu teir í 9 vikur, fingu 150 skippund, og vóru aftur á Fuglafirði 6. okt. Íslandsveiðan varð seld fyri kr. 5.600,-.

Eftir stuttan steðg í Føroyum fóru fyrrnevndu eigarar av "Tulip" niður til Hetlands við fiskinum, og hava tá goldið tað, sum restaði í og fingið skeytið upp á skipið.

Í skrásetingarskjølum í Hetlandi sæst, at "Tulip" var bygd í 1879 í St. Malo í Fraklandi. Hon var skrásett í Grimsby, áðrenn hon kom til Lerwick í Hetlandi 6. nov. 1895, har hon var skrásett til 29. okt. 1904.

30. mars 1904 er "Tulip" av táverandi eigara, Petur Garriock, Lerwick, vorðin skrásett sum fiskiskip ("sea fishing boat") og merkt **LK 25**. Henda skráseting er útstrikað sama heystið. Hugsast kann, at eigarin, Peter Garriock, hevur latið Gøtumonnum eitt *fyribils* skeyti upp á **"Tulip" LK 25** um várið 1904, og at tann *endaliga* sølan er farin fram um heystið sama ár.

Við skeyti dagfest 28. okt. 1904 er "Tulip" seld til Føroyar, og 29. okt. 1904 stendur "Tulip" at vera strikað úr skipaskrásetingini í Lerwick.

Av skjølum úr Hetlandi sæst, at "Tulip" er farin úr Lerwick **2. nov. 1904** á veg til Føroya. 10. des. 1904 veit Dimmalætting at siga, at "Tulip", ið skuldi á Fuglafjørð, var ikki framkomin, og at fólk heima í Føroyum tá vóru vorðin bangin um skipið.

Sambært Shetland News 28. jan. 1905 hevur tíðindamaðurin í Tórshavn við skrivi dagfest 16. des. 1904 til Mr. Andrew Smith, Lerwick, spurt eftir "Tulip", sum teir ikki høvdu frætt eitt orð frá, og sum tey tí høvdu mist alla vón um. Blaðið veit at siga, at "Tulip" hevði verið í Lerwick seinnapartin í oktober við eini fiskalast - at skipið var keypt úr Lerwick –, at teir fóru út 2. nov., men stutt aftaná at teir vóru útfarnir kom illveður, og hetta illveðrið vardi allan november mánað, so roknast mátti við, at teir vóru farnir í tí veðrinum. Við skipinum vóru 6 mans.

**26. januar 1905** boðar sýslumaður Petersen í Fuglafirði sorinskrivaranum frá, at nevndu **6 mans** mugu haldast at vera burturgingnir við "Tulip" í november mánað 1904, og meldar hann tað tá inn til skiftirættin.



*Mynd av Tulip.*

Menninir vóru:

1. Hans Frederik Hansen, f. 17/6-1874, 30 ára gamal, giftur, var skipari.
2. Peter Jacob Hansen, f. 26/11-1878, 26 ára gamal, ógiftur, var smiður.
3. Samuel Peter Joensen, f. 6/8-1882, 22 ára gamal, ógiftur.
4. Joen Pauli Poulsen, f. 7/4-1875, 29 ára gamal, giftur.
5. Simon Peter Olsen, f. 15/5-1883, 21 ára gamal, ógiftur.
6. Carl Fr. Olsen, f. 18/12-1878, 26 ára gamal, ógiftur.

Sigast kann um hesar menn:

***ad. 1) og 2):***

**Hans Fr. og Peter Jacob Hansen** vóru brøður. Teir vóru synir Hans Jacob Hansen **hjá Glyvra-Hanusi**, sum 35 ára gamal umkomst við "Kirkjubátinum" 23. mai 1879 á veg aftur av handilsferð í Klaksvík. Tá var Hans 5 ára gamal og Petur Jacob ½ ára gamal.

Hans hevði konu úr Havn – Anna Maria, f. 19/12-1872 – vanliga nevnd *Mia*. Mia, ið var dóttir Valta-Jógvan í Havn og systir Hannu hjá Gøtu-Jákup, bleiv avgomul. Hon doyði 20. apríl 1972,



*Elsa og Joen Pauli Poulsen. Umframt tað sum stendur í greinini um Elsu veit Maria Jacobsen, Elsa var abbasystir hennara, at hon flutti til Suðuroyar, har hon gjørdist "harraskræddarinna" við m.a. at seyma klædningar. Seinni flutti hon til Havnar, har hon doyði í 1953. Hon búði allar dagar saman við síni heilsuveiku dóttir Olgu, og hon bað eftir, at Olga skuldi doyggja áðrenn hon, tí tað var eingin annar at taka sær av henni. Henda bøn varð hoyrd, tí Olga doyðu 1-2 mánaðar áðrenn hon sjálv.*

*Hans Fredrik Hansen og Peter Jacob Hansen*





*Úr hesum grannalagi í Norðagøtu fóru 4 av teimum 6 monnum á Tulip sum greitt frá í greinini. Húsini vit síggja er f.v. á Geilabø, á Brúnni, hjá Thorvald, í Tjørnustovu, hjá Ísaki, í Mortanstovu, í Jákupsstovu, hjá Peri, hjá Glyvra Hanusi, hjá Sámali og kirkjan. Húsini í Liðanum stóðu millum húsini í Mortanstovu og á Brúnni.*

og vantaði sostatt bert nakrar mánaðir í 100 ár.

Hans og Mia áttu ein son – Hans Jacob Sofus Hansen, f. 5/7-1903 – seinni Hans Jacob Havstreym, ið fórst við "Immanuel" í apríl 1932, knapt 29 ára gamal og ógiftur. Hann var tá júst blivin valdur til formann í fiskimannafelagnum og høvdu vit fyrr í ár eina frásøgn um hann.

Av hesum sæst, at hetta húsið hevur verið eitt sorgarhús – **3 ættarlið** eru farin á sjónum frá teimum hjá Glyvra-Hanusi, nevniliga í 1879, 1904 og 1932.

Glyvra-Hanusarhús eru nú ogn Gøtu Fornminnisfelags og eru endurreist m.a. til minnis um hesar *slóðbrótarar*, sum – umframt at vera gerðismenn og útróðrarmenn – *eisini* royndu at leggja lunnar undir **sluppfiskiskapin í Gøtu**.

Húsini vórðu friðað í 1975 sum *liður* í varðveiting av gomlum bygdalag í Norðragøtu.

***ad. 3):***
**Samuel Peter Joensen** var sonur Onnu Sofíu **á Brúnni**, ið tá var 56 ára gomul, og sum var einkja eftir Jóan Hendrik á Brúnni, sum doyði í 1902, 53 ára gamal, aftaná at hava verið sjúkur í mong ár. Sámal Petur átti 2 systkin: systrina Onnu Jovinu, f. 1885, og sum tá var 19 ára gomul, og bróðurin Jóan Jacob, f. 1894, og sum tá var 10 ára gamal.

Av hesum sæst, at Sámal Petur á Brúnni bert var 20 ára gamal, tá hann varð faðirleysur, og at Jóan Jacob á Brúnni var bert 10 ára gamal, tá hann var bæði faðir- og bróðurleysur.

Núverandi húsini "á Brúnni" eru bygd í 1904, t.v.s. aftaná at Jóan Hendrik er deyður og sama árið, sum "Tulip" gekk burtur. Sámal Petur sigst bert at hava sovið einar tvær nætur í húsinum...!

***ad. 4):***
Joen Pauli Poulsen – vanliga nevndur **Palli í Polliliða** – hevði konu av Heimabø í Søldarfirði, Elsa Kristina, f. Olsen, ið var systir Hans bónda. Elsa í Polliliða, ið var 32 ára gomul, tá ið maðurin doyði, sat eftir við 4 smábørnum:

1. Eliesar Poulsen, f. 15/1-1898. Hann vaks upp í Mikkjalstoft við Gøtugjógv, tók læraraprógv í 1917. Aftaná arbeiddi hann hjá J. Dahl, Gørðum, í Vági. 1927 giftur við Sofíu Jensen, ættað av Viðareiði. Tey búsettust í Klaksvík. Tey áttu eingi børn. Eliesar doyði í 1981.
2. Olaf Poulsen, f. 7/9-1899. Hann giftist til Vágs við Elisabeth í Sápuhúsinum, ættað úr Porkeri. Tey áttu eingi børn, men fostraðu Óluvu, dóttir Palla Bager, upp. Olaf doyði í 1930'unum.
3. Joen Pauli Poulsen, f. 15/7-1901, – vanliga nevndur **Palli Bager**. Kona hansara – Anna – var ættað av Velbastað. Tey búðu í Havn til aftaná 1950, tá tey fluttu til Danmarkar at búgva. Tey áttu fleiri børn.
4. Olga Poulsen, f. 1903, var ógift. Búði í Havn saman við móður síni tey seinastu árini. Tær doyðu báðar sama ár – umleið 1953 – og eru jarðaðar í Havn.

Palli í Pollaliða var sonur Hans David Poulsen – Liða Dáva – við fyrru konuni, Elsu Mariu Gregersen, ættað úr Kunoy, d. feb. 1881. Palli var knapt 6 ára gamal, tá hann misti mammuna. Hann átti bert *eina* samsystir, Elsebeth Mariu, f. 1879, ið giftist við Juul Høgnesen í Lorvík.

Palli í Pollaliða má hava verið sera raskur maður. Hann hevði lagt sær gerði inn heimanfyri Myllánna, niðanfyri Nýggjagerði, girt tað við stórum gróti og bygt sær sethús í gerðinum. Hann hevði stóra familju og var nú við til at keypa skip til bygdina, bert 29 ára gamal!

Polliliðahúsini stóðu langt burtur frá bygdini tá. Tá var einki annað hús innanfyri húsini "fyri innan Á". Polliliðagrundin sæst enn – nú inni á Jørundstovufestinum. Húsini stóðu uppi til umleið 1930.

***ad. 5):***
Simon P. Olsen – **Símun í Mikkjalstoft** – var sonur Onnu Kristinu Simonsen, ættað úr Vestmanna, ið var einkja eftir Hans Paula Olsen, ættaður úr Tøðuni, sum var burturgingin á báti á Norðfjørðinum í Íslandi í juli 1890, 38 ára gamal, saman við tí yngsta beiggjanum, Jóan Hendrikki, ið bert var 20 ára gamal.

Anna Kristina og Hans Pauli í Mikkjalstoft áttu 3 synir:

1. Óli Olsen, f. 6/3-1882, d. í mars 1903 við "Cyclone", 21 ára gamal.
2. Simon P. Olsen, f. 15/5-1883, d. nov. 1904 við "Tulip", 21 ára gamal.
3. Jacob Pauli Olsen, f. í 1885, deyður av vanlukku í nov. 1895, 10 ára gamal.

Aftaná hesa syndarligu vanlukku í 1904 sat Anna Kristina *einsamøll* eftir í Mikkjalstoft – **tá hevði hon mist alt** – bæði mannin og allar 3 synirnar...! Og festið í Tøðuni, ið Hans Pauli, sum var elstur av beiggjunum, var borin til, men ikki hevði fest, tá ið hann doyði, fór yvir til Jákup í Tøðuni, ið var næstelstur av beiggjunum.



*Fremst er Glyvr-Hanusarhús við Miu, hennara børnum og eini abbasystir hjá børnunum. Undir liðini á Miu er Hans Jacob, sum gjørdist formaður í FF.*

Anna Kristina í Mikkjalstoft fostraði Elieser Poulsen upp, aftaná at "Tulip" var burturgingin – mamma hansara, Elsa í Polliliða, og Hans Pauli í Mikkjalstoft vóru systkinabørn, av tí at mamma Elsu, ið eisini æt Elsa, var ættað úr Tøðuni – systir Gamla-Óla.

Anna Kristina í Mikkjalstoft fylgdi við Elieser Poulsen – tað má hava verið aftaná fyrra heimsbardaga – fyrst til Vágs og síðani til Klaksvíkar, har hon livdi síni seinastu ár inni hjá Elieseri og Fíu. Anna doyði umleið 1930 og er jarðað í Klaksvík.

***ad. 6):***
Carl Fr. Olsen – **Carl á Heimbø** – var beiggi Elsu í Polliliða og Hans bónda í Søldarfirði, og hevur sostatt verið svágur Palla í Polliliða.

Á Heimbø í Søldarfirði vóru tey nógv systkin. M.a. kann nevnast Sam Olsen, keypmaður í Havn, og Óli Olsen, giftur við Sofíu Thomsen av Eiði, ið seinni búsettist í Vági. Sonur teirra, Carl Herup Olsen, ið var heilsølumaður í Havn, man hava itið eftir pápabeiggja sínum, Carl á Heimbø. Carl Herup er júst deyður.

Á minnisvarðanum fyri sjólætnar í Søldarfirði, ið var avdúkaður 2. okt. 1983, eru mong nøvn at vinna, m.a. **Carl Fr. Olsen**, ið fór við "Tulip" í 1904 og **Hans Jacob Havstreym**, ið fór við "Immanuel" í 1932.

Sum fyrr nevnt var henda vanlukka ein dyggur smeitur fyri bygdina – og serliga fyri hesar neyðars familjur, sum so hart vórðu raktar.

Hesir ungu menn, ið júst høvdu sett føtur undir egið borð, og sum við ágrýtni og við ríkum vónum løgdu til brots fyri at skapa sær og sínum eitt betri lívsgrundarlag, aftaná at flestu teirra høvdu livað undir trongum korum, bæði í barna- og ungligaárum, máttu nú falla í bardaganum við havið – eins og mangur góður føroyingur, bæði undan og aftaná teimum...!

Men lívið heldur áfram sína gongd...

***I.*** Einkjan eftir Hans hjá Glyvra-Hanusi – Anna Maria – giftist uppaftur við Petur Petersen, Petur hjá Miu, og tey fingu 2 børn, Hans Petur og Onnu Berlinu. Anna Berlina giftist til Noregs og Hans Petur tók húsið upp hjá Glyvra-Hanusi og búði har saman við familju síni, til hann í 1958 bygdi nýggj hús inni í Glyvra-Hanusargerði. Aftaná hetta

vórðu húsini útleigað av og á. Í 1973 keypti Gøtu Fornminnisfelag húsini, fyrst og fremst at nýta sum felagshús og umvældi tey. 1975 eru húsini – sum fyrr nevnt – vorðin friðað av fornminnismyndugleikanum saman við Gøtu Kirkju, Blásastovu og umliggjandi húsum.

***II.*** Jóan Jacob, beiggi Sámal Petur, tók húsið upp **á Brúnni**, giftist við Hansinu Øregaard úr Lorvík og fingu tey 2 døtur – Annu, ið er gift við Jóan Jacob Justinussen úr Lorvík, men eru búsett í Danmark, og Poulu, gift við Gullbrandi Olsen úr Søldarfirði, men sett búgv í Norðragøtu. Húsini á Brúnni, ið eru 100 ára gomul, eru umvæld fyri nøkrum árum síðani – og okkurt skifti eru tey leigað út.

***III.*** Um Polliliðahúsini er at siga, at aftaná at Palli var deyður sigst Elsa ikki at hava støðast nógv inni í Polliliða, var bert har av og á. At sita einsamøll við smábørnum inni undir Ritafjalli um veturin – í myrkri og illveðri – burtur í óbygdum kundi ikki vera unniligt! Sagt verður, at hon ferðaðist ímillum – var stundum í Mikkjalstoft og stundum úti á Heimbø. Elsa verður søgd at hava verið eitt arbeiðssamt fólk – hon vann sær og sínum til lívsins uppihald m.a. við at baka til handlar, stundum í Gøtu, eitt skifti bakaði hon í Lorvík, og eisini inni hjá Jóan Petur á Stongunum í Klaksvík, o.a. Sum fyrr nevnt stóðu Polliliðahúsini uppi til umleið 1930, og grundin sæst enn.

***IV.*** Tá ið Anna Kristina fór úr Mikkjalstoft einaferð aftaná fyrra heimsbardaga, keyptu brøðurnir Eyðin og Óla Jákup Hansen húsini í Mikkjalstoft og búðu har saman við gomlu móður teirra, Onnu Katrinu við Gøtugjógv, til hon doyði í 1921. Seinni yvirtók Eyðin við Gøtugjógv húsini og búði har við síni familju frá 1923 og úteftir. Aftaná hann tók dóttir hansara, Ólfríð, gift við Torbjørn Niclasen, sála, húsið upp, og tey bygdu nýggj hús á grundina í Mikkjalstoft.

Mong skip eru komin til bygdina, síðani hesin sorgarleikur fór fram fyri 100 árum síðani – men í dag eru ikki mong fólk í Gøtu, sum vita um umstøðurnar hjá teimum, ið eftir sótu aftaná hesa vanlukku – hvussu illa mong av teimum vóru fyri, og *hvussu dýrt* hetta **fyrsta skipakeypið til Gøtu** gjørdist hesum monnum og avvarandi teirra...!

Tí verður hetta fest á blað.

**Gøtu Fornminnisfelag**
*Arnley Jacobsen*,
formaður
*Sigfríður Joensen*,
næstformaður

Upplýsingarnar um skipið "Tulip" havi eg frá ommu míni, Onnu Jovinu Joensen, ommubeiggja mínum Jóan Jacob Joensen, landsskjalasavninum, og við at vitja skjalasavnið og á skipaskrásetingini í Lerwick.

Øllum takki eg hjartaliga.

***Sigfríður Joensen***



*Soleiðis sá dekkið út á eini slupp.*



*Modellið av Tulip.*

# Grønlandstíðindi

## frá Kára við Stein



15. oktober

Í dag er av besta veðri, men veðurmenninir lova upp í 15 m/sek. av norðri. "Mercey Phoenix" kom inn seinnapartin við einum canadiskum sjómanni, ið hevði mist lítlafingur. Sjúkrabilurin tók í móti honum, og koyrdi hann á sjúkrahúsið, har hann varð viðgjørdur, og varð síðani sendur heim til Canada. Umborð á bátinum er ein føroyingur, ið er maskinovasti. Hann ættaður úr Klaksvík. Hann hevur búð í Canada í 25 ár. Trolarin hevur gott 500 tons inni, men tað hevur ikki viðrað væl hjá teimum. Teir hava haft bakkdagar, tí veðrið hevur verið so vánaligt. Teir fiska fyri tað mesta við trimum trolum. Trolarin lastar gott 800 tons av rækjum, og teir fóru aftur til fiskarí so at siga beinanvegin. Nú vit skriva um canadiarar, har føroyingar eru við, so kann eg leggja afturat, at "Atlantic Enterprice" og "Ocean Prawns" vóru í vikuni inni í Harbour Grace og landaðu.

19. oktober

Stilli og 3,5 hitastig. Gamla Havørnin "Tina Rosengreen" kom inn at landa knapt 20 tons av jákupsskeljum, og ein annar skeljabátur kom inn í morgun at rætta okkurt brek. Teir hava verið heilt norður við Disko og roynt, og fiskaríið hevur verið brúkiligt.

29. oktober

Í dag er stilli. "Lómur" kom inn at landa knapt 80 tons av ísaðum rækjum, og "Polar Amarok" kom eisini inn í morgun. Teir hava gott 270 tons, og skulu inn aftur til Nuuk um tríggjar vikur at landa.

21. oktober

Tað er stilli og 2,5 hitastig. Hevði hetta verið sum ein vanligur vetur, so var hvítt í bakka, men nú er tátt og eitt lítið følv á fjallatopp. "Ocean Tiger" kom inn seinnapartin at landa, teir hava um 300 tons av posarækjum.

24. oktober.

Í dag er stilli og 3,5 kuldastig. "Steffan C" kom inn við 100 tonsum. Teir skulu til Íslands at landa hendan túrin, tí har er prísurin á posarækjum betri enn her hjá okkum. Eisini var ætlanin at bunkra, men sunnudag gerst einki við bunkring, so teir vóru noyddir at fara inn í Nuuk at bunkra, áðrenn teir kundu fara til Íslands at landa.

Allir trolarar hava avreiðingarskyldu uppá 25% av kvotuni til virkingar her, men so løgi tað ljóðar, so klárar Royal Greenland ikki at arbeiða undan, tí verða posarækjur sendar til Danmarkar til pilkingar. "Nanok Trawl" kom inn í morgun við fullari last og skulu byrja at landa ímorgin. Nú vænta teir at oljuprísurin fer upp ein av fyrstu døgunum – prísurin í dag er 1,97 kr. fyri liturin – væntast kann at prísurin fer upp við 88 oyrum fyri liturin, so tað verður ein eyka byrða at fáa omaná teir vánaligu prísirnar á rækjum.

27. oktober

Í dag eru 3,5 hitastig millum strúk í vindi og storm av suðri og regn tað mesta av degnum, men út á seinnapartin vátaslettingur og avtakandi. Tann stásiligi trolarin "Markus" kom inn at bunkra 600 tons, áðrenn prísurin fer upp, og løgdu teir samstundis nakað av rækjum upp, teir hava umleið 450 tons inni. "Akamalik hevur verið inni í Nuuk við gott 500 tonsum. "Anna Kiil" er eisini inni og leggur upp 22 tons av pilkaðum jákupsskeljum, ið teir henda túrin hava fingið heilt uppi við Disko, har veðrið hevur verið ógvuliga vánaligt. Eisini "Polar Timmjarmiut" kom inn at bunkra og løgdu samstundis upp 300 tons av rækjum, ið teir høvdu fingið uppá 14 dagar. Teir nýta bert eitt trol, tí teir hava ikki maskinorku til meira. Teir skuldu sigla kl. 21.00 í kvøld, so teir landaðu til siglt varð.

28. oktober

Tað er av ringasta veðri í morgun við stormi og kavaroki og 2,3 hitastig, men út á dagin varð veðrið nakað betri. "Louise L" kom inn við onkrum breki, teir kundu ikki fiska kortini.

30. oktober

Framvegis av ringasta veðri stormur og vátakavi og eisini regn av og á. Tað var so mikið nógvur vindur, at onkur bátur máldi ta einu løtuna 32 m/sek. "Walter Hervig III", ið er royndarskip heimahoyrandi í Bremerhafen, kom inn her í dag. Eg spurdi, á mínum góða enska, hvat teir royndu eftir. Tann eini svaraði, at teir royndu eftir einum fiskaslagi, ið hevði navnið á kaviar, hann visti ikki tað enska navnið, men fiskurin var grønur á liti. Eg smekkaði til, at tað mundi vera rognkelsi teir royndu eftir, og hann játtaði, so tað føroyska málið kann nýtast víða hvar!

## Frásøgnin hjá Lisu – 2. partur:

*Tær flestu myndirnar í hesi grein eru læntar frá Heina Johan Glerfoss.*



**At taka úr blaðnum**

**Síðurnar 9, 10, 15 og 16 kunnu takast úr blaðnum**

# Læknakynstur í Mikladali

Maud Heinesen helt áfram við síni samrøðu við fosturmammu sína Lisu Jacobsen. Umframt onnur viðurskifti hoyra vit um læknakynstur í Mikladali. Marin hevði enntá sjúkrahús heima hjá sær sjálvari:

### Hvar hitti abbi ommu?

Hann fór norður til Mikladals til Jóhan Petersen, og har var hann í átta ár, inntil hann giftist. Hann settist so upp á egin hond yviri í Leirvík, men hann segði altíð, at hann angraði, at hann nakrantíð fór yvir aftur til Leirvíkar, tí har kastaði hann seg yvir forrætning, og tað bleiv ikki gott. Jóhan Petersen bjóðaði honum forrætningina.

### Hasin Jóhan Petersen, tað hevur verið ein stórur maður?

Tað var ein framúrskarandi maður tá í tíðini. Hann dugdi alt. Hann hevði góðar hendur. Hann smíðaði jarn, og av tí grund, at Petur Heinesen, langabbi tín, og hann arbeiddu so væl saman, so hevði Petur altíð fríheit at koma inn í smiðjuna hjá honum. Hann smíðaði sínar knívar, hann smíðaði sínar hakar, hann smíðaði tað, sum honum tørvaði. Jóhan Petersen skuldi vera eitt sindur seinur maður, men tað, sum hann gjørdi, skuldi vera so óalmindiliga gott.

Tá á døgum vóru so grúðuliga góð forhold í Mikladali. Tað vóru tríggjar góðar jarnsmiðjur. Jóhan Petersen kastaði seg ikki so nógv út yvir líggjar, men tað gjørdu Norðnastovumenninir. Teir smíðaðu líggjar meginpartin fyri allar Føroyar. Líka suðuri úr Sumba komu boð til Mikladals, tí teir høvdu sovorðið egið stál, og tað meintu teir, teir høvdu fingið ígjøgnum ein mann á Trøllanesi, sum sigldi uttanlands. (Hetta kann hava verið Jóhannes í Innistovu, sum var ein av teimum, sum stóð aftanfyri "Caprice", eina ta fyrstu skipaætlan í Norðoyggjum). Ein heilt gamal maður, hann var skipari, og hann kom onkuntíð heim ímillum, og so plagdu teir at biðja hann forverva sær stál. Tað stálið, sum teir høvdu, skuldi vera so sera hvast.



*Hetta eru húsini hjá Johan Petersen, Suðuri í Húsi. Persónarnir eru hesir. Framman fyri hoyggið: f.v. Brynhild Glerfoss, gift við Jógvan, ættað úr Kvívík, Hans Jacob í Uttarustovu og Anna Sørensen, dóttir Jógvan Andreas, giftist við Johan Elias Eliassen í Hússtovu. Uppi á hoynum f.v. Sigmund Hansen í Uttarustovu og Jógvan Andreas Sørensen. T.h. fyri hoyggið. f.v. Johan í Uttarustovu, Johan Sørensen og Sámal Sørensen. Sámal Anna og Johan vóru systkin. Hans J, Sigmund og Johan Hansen vóru beiggjar.*

### Handilshús fyri allar Norðoyggjar

Johan bygdi sær eitt hús niðan fyri bakkan, har hann tók ímóti øllum fiski og goymdi allar vørur uppi á loftinum. Men so, tá ið fráleið, tók hann og innrættaði eina deild av húsunum, har hann útseldi. Hann hevði eisini allar vørur. Tað var ofta, at fólk komu aðrasteðs frá at keypa eitt og annað, sum



*Maren Krett Andreasdatter, sum hevur ein avgerðandi leiklut í frásøgnini hjá Lisu.*



*Johan Petersen, framburðsmaður í Mikladali.*

Jóhan Petersen lá inni við. Tey grinu við hvørt at, at einaferð skuldi hann fáa so óalmindiliga nógv toy. Tað skuldi vera 200 metrar. Tá helt kona hansara tað, at hann mátti bestemt hava skrivað eitt null for nógv. Hvussu tað var við tí og ikki, men alt toyið bleiv selt. Tað frættist um allar Norðuroyggjar um hetta deiliga toy, sum Jóhan Petersen hevði fingið. Teir brúktu tað til buksur, mannfólkabuksur, og tað hevur verið... eg veit ikki, hvussu man skal kalla tað, tað var ljóst, sovorðið, sum teir gjarna brúktu, tá ið teir arbeiddu. Tað hekk ikki uppi í ullintu klæðunum. So tað var ein høj og hastur, inntil Jóhan Petersen hevði selt alt toyið.

### Tá primussurin kom

Hann hevði tógv, hann hevði øll smávegis ting, sum hann kundi hava, og hann keypti tær troyggjur, sum keypast kundu og sendi. Og eisini grinu teir at tí, at tá ið hann sá okkurt í bløðunum – hann helt øll útlendsk bløð – for eksempul sum einaferð. Nú hevur hann uppdagað tað, at teir kunnu brúka ein primus. So skrivar hann eftir hesum her. Hann fer til Klaksvíkar, har hann hevur fingið vøru, og kemur so norður aftur. Nú sigur kona hansara við hann: "Góði, hvat er hatta, tú ert komin við nú?" "Tig nú", sigur hann. So nú setir hann hettar á borðið, og hann fer at tendra, koyrir spritt á skálina, og so tendrar hann. Nú blívur eldurin so ógvuliga høgur, og hon rópar: "Jesus náði tú meg, nú kemur eldur í alt". "Sit tigandi", sigur hann. Sum rímiligt, nú dampar hetta niður aftur. So fer hann at pumpa, men tá ið hann hevði pumpað og sett ketilin útá, og tað fór at kóka, tá var gamla í góðum lag. Men hvat virkaði hettar? Hettar virkaði so, at onnur fólk fortaldu, at Jóhan hevði fingið nakað nú, sum tey kundu kóka drekka við í einum ketli á borðinum. Og tað komu boð bæði úr eysturi og vesturi at biðja hann bestilla sær primussar.

Sovorðin maður var hann.

Men hesin maðurin, Jóhan Petersen, er eisini í

*Framhald á næstu síðu*

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA





*Johan og Anna Katrina Petersen vóru barnleys. Men tey tóku Joen Andreas Sørensen, úr Kunoy til sín. Hann giftist við Johanne Christine Olsen úr Kvívík. Her síggjast tey saman við børnunum f.v. Sámal, Onnu Catrinu og Johan Andreas.*



*Hendan myndin er tikin í 1927/28 uttanfyri Suðuri í Húsi. Í aftara rað síggjast f.v.: Jógvan Andreas Sørensen, Johan Sørensen, Kristina Sørensen, Anna Sørensen, Rigmor (arbeiðsgenta í Hússtovu), Marin Petersen, Magnus Eliasen, Sofus Hendriksen, Niels Østerø og Anna Margretha Østerø.*

*Fremra rað: Sigmund Hansen, Poul Andreas Petersen, Samulina Petersen, Andrass Olsen (frammanfyri Samulinu), Meinhard Petersen, seinni Mikladal, Absalon Østerø, Pól Poulsen og Líggjas Eliasen (heldur í hondina á abbanum).*

familju við tykkum, men longri burtur. Tí pápi hansara er úr Leirvík. Hann æt Pól, og hann var slektaður úr Innistovu, og abbi tín og hann vóru í familju. Tí kom hann norður til Jóhan Petersen.

**Fosturpápi mín Eliseus var av Syðradali. Hvussu við pápa hansara Símun Paula?**

Símun Pauli var av Syðradali. Kona hansara Julianna var slektað úr Lonini í Fuglafirði. So tað hevur einki við okkara familju at gera. Julianna stammaði frá Myrkjanoyrs-Jógvani tey kalla, bóndanum. Og ein dóttir Myrkjanoyrs-Jógvan var gift í Fuglafirði, og hon var omma Juliannu. Pápi Símun Paula var av Brúgv í Mikladali. Hann fór sum ungur maður til Havnar at læra seg at vera lærari, tí hann var eitt sindur framúr maður, men tá ið hann kom norður aftur til Mikladals og skuldi fara at taka sær av børnunum, tá var ein tíð, tá ið tey løgdu allar skúlar niður. Hann æt Brúgva-Jákup.

Tað hevur verið nakað seint í 1800. Men tvey ár aftaná, tá fór Absalon á Trøllanesi suður til Havnar. Hann var eitt ár har suðuri og lærdi seg eisini til skúlabørn. Tá fóru teir at byggja skúlar aftur, tí teir sóu, tað bar ikki til at leggja skúlarnar niður. Hesin Brúgva-Jákup giftist so suður til Syðradals. Hann hevði børnini fyri seg hvønn sunnudag, so børnini á Syðradali áttu eitt sindur av kunnleika frá honum, so tey kundu skriva. Og hann var so mikið lærdur maður, at um tað var nakað, sum skuldi skrivast ella sendast aftur og fram, so máttu tey biðja Brúgva-Jákup. Hann skrivaðist Jákup Olsen.

**Læknavísind í Mikladali. Marin hevði sjúkrahús sjálv!**

Marin hevði síni ríku evni, og tað var læknavitinskapur. Hon lekti fólk so undurbart. Eg veit, at hon hevði fólk liggjandi uppi hjá sær, tí hon var eldri kvinna og orkaði ikki altíð so væl at ganga. Tá ið tey vóru lamin í beinunum ella soleiðis, so tók hon tey niðan til sín. Hon hevði eitt vár tveir menn liggjandi haruppi. Annar hevði hann verið so óheldigur, at hann hevði mist ein knív niður í beinið, einaferð hann var útrógvin, og hin svall í einari tá. Hon hevði teir liggjandi uppi hjá sær, tí tað var vónleyst hjá henni at ganga oman til teir. Og tað, sum hon lekti við, var meginpartin urtir og fruktir.

**Hvør hevði lært hana?**

Bók hevði eingin verið har í húsinum, tað tey vita um, men hvat hon ikki kann hava snakkað við onkran... Tey kallaðu ein mann í Gøtu... eg veit ikki, hvat ið hann kallaðist, men Heiða-Jógvan, hann er so seinni í tíðini. Nú skrivaði ein í Havn um, tá ið Heiða-Jógvan lekti pápa sín, Sigfred, mann Jóhannu Matheu. Hann skrivaði soleiðis, at pápi sín í sínum ungu árum hevði fingið eitt so forferdiliga hovið bein. Tað var hovið frá knænum og oman, eg veit ikki hvussu nógv. Doktarin segði, har var einki at gera uttan at leggja hann út á sjúkrahúsið – tað var ein almindiliga góður doktari – og taka beinið av honum. Nei, segði mamman, eitt skuldi prøvast, tað var Heiða-Jógvan. Jú, Jógvan endavendi pápanum, og so fór hann at gníggja og strúka og leggja dittin og dattin uppá, uttan at tað fór at ganga fram. Tað gekk leingi at begynna við, men so kom tað, og pápin kom aftur til ferigan mann og var bæði eitt og annað.

Eg veit tað, at har norðuri í Mikladali høvdu tey sovorðið álit á Marini, at um Marin ikki kundi lekja tað, so stóð tað ikki til redningar. Og tey meintu eisini tað, at tá ið Heini hevði høgt seg í knæið, høvdu teir farið til Mikladals eftir Marini og fingið hana suður, so hevði Heini ikki fingið stívt bein.

**Hvar hendi tað?**

Tað hendi á Syðradali. Teir bygdu húsini hjá Martu og Jógvan. Heini høgdi seg í knæið, og teir fóru inn til Klaksvíkar við honum. Doktarin hugdi og bara bant knæið til og legði tað stívt. Og tá ið Marin fekk at vita tað, tá var beinið hovnað. Tá royndu teir at bróta seg út við Marini inn til Klaksvíkar. Hon helt vakt yvir honum í fleiri mánaðar og royndi at lekja sárini, sum teir skóru so hvørt, men tá var betendilsi komið í alt beinið.

Eg kann minnast sum smágenta – tú veitst, eg var 6 ár, tá ið hon doyði – at tá ið for eksempul teir fóru á fjall fyrstu ferð, tað var smátt, so tók hon nakað av nýrumørinum og smeltaði tað. Hon smeltaði tað upp á sín máta og koyrdi nakað í, sum hon hevði fingið frá apotekinum fyri at bevara tað, at tað ikki skuldi tróna. So koyrdi hon tað í smáar krukkur, og altíð hevði hon roð útyvir. Og tað bleiv sett upp í erva á eina hill í hjallinum, har var kalt. Tað er akkurát so fyri mær, sum tað kundi vera borsyra ella okkurt sovorðið, hon koyrdi í. Hvítt var tað.



*Hendan myndin er tikin uml. 1880 og vísir børnini hjá Marin og Petur uppi í Tungu, Olevinu, 1872-1960, Poul Andreas, 1884-1957, og Heini, 1874-1942*



*Stellu-Pól var beiggi Óla í Útistovu. Marin bjargaði eygað á honum aftaná hundsbit, so einki sást til tað.*



*Heini uppi í Tungu (1874-1942) sonur Marin og Petur, og konan Jóhanna, ættað úr Pállstovu í Mikladali. Tey giftust í 1907.*

Framhald á síðu 15

Nicolina og Hjørdis:

# Til Íslands fyri 50 árum síðani

**Tað er kent, at tað gjøgnum tíðirnar hevur verið nógv samband millum Føroyar og Ísland. Vit hava fiskað undir Íslandi í meira enn 100 ár, og fleiri hundrað føroyskir fiskimenn eru druknaðir undir Íslandi og føroyskir fiskimenn eru jarðaðir kring alt Ísland.**



*Her eru tær ungar og vakrar… (Nicolina er t.v.)*



*…tað eru tær framvegis. (Nicolina er t.h.)*

Sambandið til Íslands gjørdist av einum øðrum slagi í 50-árunum, tá vit høvdu nógv arbeiðsloysi í Føroyum, og nógvir føroyingar fóru til Íslands at vinna. Tað, vit hava hoyrt mest um, eru allir fiskimenninir, sum fóru til Íslands at fiska við íslendskum skipum. Okkurt árið taldu teir upp til 1400 mans.

Eisini føroyskar gentur fóru til Íslands, fyrst og fremst at arbeiða í fiski, men eisini til annað arbeiði. Meðan teir flestu menninir komu aftur, so var ein heilur hópur av gentum, sum funnu sær maka, og tí vóru verandi í Íslandi. Við eftirkomarum er tað nú blivin ein heilur hópur.

Vit hava hitt tvær teirra, sum vóru millum tær fyrstu genturnar, sum fóru til Íslands í umrødda sambandi. Tær hava júst verið í Føroyum í samband við, at tað 14. oktober vóru 50 ár síðan, tær fóru til Íslands við ferðamannaskipinum "Dronning Alexandrine". Og tær høvdu sjálvsagt sínar íslendsku menn við sær.

Hesar eru Nicolina Kjærbæk (Vigfusson) úr Sumba og Hjørdis Hentze (Magnusson) úr Hovi.

Tær kendust, áðrenn tær fóru avstað, tí tær høvdu arbeitt fisk saman í Vági. Men at arbeiða fisk var ikki eitt støðugt arbeiði, og á sama hátt, sum mong ung hugsa í dag, so høvdu tær hug at royna lívið uttanfyri landoddarnar.

Hjørdis átti longu eina systir í Íslandi, sum æt Maja og sum var farin nøkur ár frammanundan saman við manninum Jens Splidt (Petursson) úr Vági. Tey bæði eru annars væl kend frá føroyska sjómansheiminum í Reykjavík, har Jens hevur verið nevndarformaður í eitt mannaminni. Hjørdis vildi sleppa til Íslands at vitja systrina, og so fekst at síggja hvat víðari hendi.

Nicolina fór til Havnar at passa systir sína Katrinu upp. Tá verður søkt eftir gentum at arbeiða á Landakoti, sum var katólska sjúkrahúsið í Reykjavík. Nicolina søkir og hon og ein kollafjarðagenta fáa arbeiði.

### Yvir við drotningini

Tá Nicolina fer avstað við "Drotningini", er Hjørdis eisini við, og vildi so til, at tær fingu eina felags lagnu í Íslandi. Báðar giftust við íslendskum monnum og báðar búsettust á Hafnafjørðinum. Og tær leggja dent á, at hóast tað fyri ferðandi er ringt at síggja mun á Reykjavík og Hafnafjørðinum, so **er tað** hvør sín býur! Tær hava gingið í bindiklubba saman við øðrum føroyskum konum nærum øll árini, og nú hava tær – sum sagt – verið í Føroyum saman.

Nicolina arbeiddi fyrst í 8 mánaðir á sjúkrahúsinum. Síðan fór hon at arbeiða á eini sjokulátufabrikk. Hon kom heim til jóla í 1956 og gjørdist sjúk, so hon slapp ikki avstað aftur fyrr enn út á várið 1957, tá Oskar kom heim eftir henni. Tá fór hon at arbeiða hjá einum bókbindara.

Oskar kom skjótt inn í myndina. Tey hittust nærum beinanvegin, tá Nicolina kom yvir. Oskar var tá fiskimaður. Tey giftust í 1958, og búðu fyrst til leigu, men í 1964 fingu tey egin hús.

Oskar kom til skaða umborð á skipi sum ungur, og í 1970 fór hann at arbeiða hjá sjómannafelagnum í Hafnafirði, har fiskimenn eisini eru limir. Her gjørdist hann formaður í 1973, og í 1976 gjørdist hann formaður fyri Sjómannasamband Íslands, sum svarar til fiskimannafelagið í Føroyum.

Hetta starv legði hann frá sær í 1994.

Tey bæði eiga trý børn og 9 barnabørn. Nicolina gekk heima, meðan børnini vóru smá. Seinni fór hon at arbeiða á skrivstovuni hjá sjómannafelagnum í Hafnafirði og er við í umsitingini av DAS happadráttinum, og hevur ofta verið í Føroyum í tí sambandinum m.a. at selja seðlar fyri DAS í SMS.

Hjørdis fór at arbeiða í einum bakaríi, har hon var í 3 ár. Hon hitti Sigga, Sigurður, sum eisini var fiskimaður. Tey seinnu árini arbeiddi hann á aluminiumsverksmiðjuni á Hafnafirði, men er nú givin fyri aldur. Tey giftust í 1961, og fingu fýra børn, eina gentu og tríggjar dreingir. Ein av dreingjunum, Ólafur, er giftur og býr í Vági. Tey bæði eiga sjey barnabørn og eitt langommu- og abbabarn.

### Framvegis føroyingar í odd og egg

Hóast tær báðar hava verið í Íslandi í 50 ár, so eru tær framvegis føroyingar út í odd og egg. Tað kemur m.a. til sjóndar við, at tær framvegis eru føroyskir/danskir ríkisborgarar og hava "føroyskt" pass. Tær hava havt nógv samband við føroyingar í Íslandi og hava verið fastir gestir á veitslum hjá føroyingafelagnum í mong ár. Og føroyingar hava javnan verið gestir heima hjá teimum, har teir hava følt seg sum heima.

Samferðsluviðurskiftini eru nógv broytt. Tá tær báðar fóru til Íslands var ikki vegur millum Vág og Tvøroyri, og millum londini slapst bert við skipi. Nú er so nógv lættari og skjótari at koma til Føroyar, ikki minsta takkað verið Atlantic Airways, har flogferðin ikki er stórt meira enn ein tími. Og so er tað eisini blivið so bíligt at ferðast! Tær eru eisini í Føroyum á hvørjum ári, onkuntíð fleiri ferðir um árið. Tað tekur framvegis sína tíð at koma til Suðuroyar, men tað er tó munandi skjótari enn fyrr.

### Føroyskur matur og "smugling"

Tær báðar elska eisini føroyskan mat, og tær hava eisini fingið íslendingar at gera tað sama. T.d. er munur á, hvussu íslendingar og føroyingar gera bløðpylsu. Tann føroyska er søtari, og tær hava mangan givið íslendingum uppskriftina upp á føroyska bløðpylsu, sum teimum dámar sera væl.

Blóðpylsa kann gerast í Íslandi, men tað kann skerpikjøt ikki. Tað má fáast úr Føroyum. Og hetta hevur ført til eitt stórt "smuglaravirksemi" hjá føroyingum í Íslandi. Tað er nevniliga ikki loyvt at innflyta kjøt til Íslands. Hetta sigst at vera vegna smittuvandan. Men veruliga orsøkin man heldur vera ein handilslig forðing fyri at verja íslendska framleiðslu.

Men tað, at ein føroyingur hevur ein kjøtbita við sær til egna nýtslu, kann ikki vera nøkur hóttan móti nøkrum. Men júst her er eitt dømi um, hvussu smáligir íslendskir tollmyndugleikar kunnu vera. Sjálvt hjá gomlum føroyskum konum gjøgnumróta teir viðførið fyri at leita eftir skerpikjøti, sum tær hava fingið frá skyldfólki, og sum tær høvdu glett seg til at njóta heima í Íslandi. Og her hjálpir eingin bøn hjá tí óhepna! Hann má síggja hesar vælsignaðu bitar hvørva.

Tað er heilt órímligt, at ein loysn ikki kann finnast á hesum øki, tá tað nú ber til at hava skerpikjøt við til Danmarkar. Men sum vit skilja, so verður arbeitt við málinum at finna eina loysn.

### Ikki útlendingar í Íslandi

Tað er einki at ivast í, at teir nógvu føroyingarnir í Íslandi hava gjørt sítt til, at sambandið millum londini er so tætt, sum tað er. Tað er so tætt, at í Íslandi verða føroyingar ikki vera roknaðir sum útlendingar og Føroyar ikki roknað sum útland. Sum føroyingur kennir ein seg eisini sera væl at koma til Íslands.

Hesar báðar kvinnur eru ímillum tey mongu, sum hava verið góð umboð fyri Føroyar í Íslandi. Tað sama kann sigast um menn teirra og børnini.

Vit gleða okkum at hittast aftur, antin tað verður í Íslandi ella Føroyum!



*Her eru tær saman við monnunum. Oskar t.v. og Siggi t.h.*

# Framleiðsla av salti

Vit hava í tveimum undanfarnum bløðum havt frásagnir um salt. Tær er grundaðar á eina ferð til Ibiza, sum M.J. Saltsølan skipaði fyri seinast í september, og har FF-blaðið eisini var við. Síðani hava vit eisini havt søguligt tilfar um okkara saltsøgu, og alt hetta vísir, hvussu stóran týdning salt hevur havt fyri okkum. Vit fara í dag at greiða frá sjálvari saltframleiðsluni, og er hon grundað á eitt kunningarblað um Ibiza. Men myndirnar eru tiknar av FF-blaðnum.

### Hvussu verður salt framleitt?

Tað er vælkent, at um vatn kemur í samband við luft hvørvur tað so við og við upp í luftina sum dampur. Henda tilgongd er ein av eginleikunum við vætum og verður kallað "evaporering" ella burturdamping.

Saltvirkini framleiða salt úr sjógvi við teirri kemisku meginregluni um burturdamping sum grundarlagi. Burturdampingin økist í beinum lutfalli við yvirflátuna av vatninum, hitan í sjálvum vatninum og í luftini yvir vatninum, vindferðini og hvussu slavin luftin er.

Las Salinas de Ibiza er eitt ídnaðarvirki, har sjógvur verður fyltur í fleiri samanbundnar brunnar fyri, í stórum skala, at skapa eina kemiska tilgongd, har saltið legst á botnin.

Las Salinas bleiv bygt soleiðis, at tað fæst gagnnýtt sum mest av tí økið, ið var til taks, so tað við hjálp av sólini og vindinum kundi fáa mest møguliga burturdamping úr teimum stóru grunnu hyljunum.

Ein kann siga, at teoretiska mannagongdin á einum saltvirki er ógvuliga einføld. Men í veruleikanum krevst sera gott handalag og ógvuliga nógvar royndir fyri at framleiða og taka upp saltið, so ein partur av okkara arbeiði er framvegis handverk.

Á kortinum sæst hvussu okkara saltvirki er sett saman. Tølini í hesi frágreiðing svara til tølini á kortinum.




**1. Tøka av sjógvi:** Saltvirkið liggur av náttúrligum orsøkum við sjóvarmálan, so tað á lættasta hátt kann fáast fatur á rávøruni – sjógvur – sum verður pumpaður inn á virkið í ávísum tíðarskeiðum. Tað er sjálvsagt, at um vit vilja hava eina optimala framleiðslu bæði viðvíkjandi góðsku og eisini nøgd, mugu vit hava ríkiligar mongdir av sjógvi. Tað eru tvær pumpustøðir: Onnur er á strondini við Es Codolar (nr. 1 á kortinum) og hin á strondini við Es Cavallet (nr. 2 á kortinum). Tær hava beinleiðis samband við havið gjøgnum veitir, ið kunnu lokast við portrum.

Tá ið sjógvurin er komin inn á virkisøki, fer hann, við hjálp av tyngdarkraftini og hæddarmuninum, spakuliga úr einum hyli í ein annan gjøgnum portur, ið verða latin upp og aftur.

**2. Lyftistøð:** Hetta eru pumpustøðir inni á virkisøkinum, ið verða nýttar til at senda sjógvin runt aftur í teir ymsu hyljarnar. Ein pumpustøð er við San Francisco (nr. 3 á kortinum).

**3. Burturdampingar brunnar:** Hesir eru ovurstórir hyljar, ið eru bygdir á slættað lendi. Skapið á hyljunum er treytað av landslagnum, og teir eru tí ikki eins í skapi. Sjógvurin, ið kemur inn í hyljarnar, hevur eitt saltinnihald uppá 30 gr. pr. litur, og eftir at sjógvurin hevur ferðast runt í hyljunum verður hann til ein laka við eini 100-140 gr/salt/litur, alt eftir árstíðini. (nr 6 á kortinum).

**4. Hita brunnar:** Hesir eru eins og burturdampingar brunnarnir stórir hyljar skildir sundur av steinella moldgørðum. Lakin, ið kemur inn í hesar hylj-



*Her verður "rásaltið" koyrt upp í lastbilar. Sagt verður, at saltlagið er uml. 10 cm. Fyri at tryggja sær, at bert tann besta góðslan verður tikin, liggja 2 cm. eftir á botninum.*



*Mortan heldur salttinnu upp ímóti sólini. Og hon borgar fyri góðsku. Salt skal ikki vera kritahvítt, tá kann fiskurin gerast saltbrendur. Men hetta saltið er júst passaligt.*



*Saltið verður lossað av lastbilinum.*



*Útsýni av "fjallinum".*

---

### Í blaðnum eru fleiri forkunningir upplýsingar, m.a. at sjógvir er ikki bara sjógvur:

Í einum litri av sjógvi er:

| | |
|---|---|
| Jarnoxid | 0,0030 gr. |
| Calcium carbonat | 0,1170 gr. |
| Calcium sulfat | 1,7600 gr. |
| Natrium clorid | 30,1830 gr. |
| Magnesium sulfa | 2,5410 gr. |
| Magnesium clorid | 0,5700 gr. |
| Natrium bromid | 0,5700 gr. |
| Calium clorid | 0,5180 gr. |

Visti tú at:
Fyri at framleiða eitt kilo av salti tørvar tær 50 litrar av sjógvi?

Gamalt indiskt orðatak
Til eru sjey smakkir, og salt er tann fyrsti av teimum.

Nýtslan av salti í heiminum er býtt soleiðis:
- 58% kemiska ídnaðinum (fyri at fáa klor, kaustiska soda, natrium carbonat, o.s.fr.).
- 19% manna- og djóraføði.
- 13% at stroya á vegirnar um veturin.
- 10% aðra nýtslu.


*Saltið verður skolað við saltlaka.*


*Hesin stendur við lítlum spaka at lofta skitnum salti.*


*Saltið fer eftir transportbandi á saltfjallið, sum er goymsla, og sum tekur heila ársnýtslu hjá Føroyum, eini 20.000 t.*


*F.v. Regin Gregersen, Sofus í Selvindi, Jónsvein Olsen og Benny.*


*Dávur Joensen, saltfiskamaður úr Klaksvík, í salti!*

arnar, hevur eitt saltinnihald upp á eini 100 til 140 gr/salt/litur, og eftir at hava ferðast runt í hyljunum er saltinnihaldið komið uppá 280 gr/salt/litur (nr. 5 á kortinum)

**5. Krystalliserings brunnar:** Lakin fer úr hitabrunnunum og í krystallingsbrunnarnar, og í hesum hyljunum nær lakin sítt mettanarpunkt, og saltið søkkur til botns. Tá ið saltið á botninum hevur fingið eina passaliga tjúkd, verður tað tikið upp við maskinum. Fyrst verður vætan tó drena burtur, fyri at maskinan kann fara í brunnarnar. Hesir brunnar eru fýrakantaðir og atskildir av pussaðum sléttum múrum. Botnurin er púra slættur og tættur, so at einki skal leka inn í brunnin og dálka saltið (nr. 4 á kortinum).

Arbeiðsgongdin er altso tann, at sjógvurin rennur úr einum slagi av brunnum í eitt annað slag, meðan saltmongdin økist so við og við, líka frá tí hann verður pumpaður inn og til saltið krystaliserast.

Salt fellur til botns alla tíðina, men í meðal tekur tað einar 110 dagar at krystalisera salt.

Í Las Salinas verður vanliga farið í gongd við krystaliseringina um várið og endað verður um summarið, ið er heitasti og turrasti partur av árinum.

**6. Útgerðin at taka salt upp við:** Til at taka saltið upp, verður nýtt serlig útgerð, ið er gjørd til endamáli. Hon er sett saman av nøkrum skuffum, ið eru í støðugari ringrás, nakað sum ein runddorg, og verður sleipað av einum traktori. Hesar skuffurnar taka saltið úr brunninum og leggja tað á eitt flutningsband, sum førir saltið yvir í lastbilar, sum síðani koyra beinleiðis yvir á goymsluna.

**7. Goymslan:** Saltið, ið kemur úr brunnunum verður koyrt á goymsluna – hon verður eisini rópt saltstakkurin ella salt ílatið. Tá tað er komið higar, verður tað vippað í eina trakt og síðani flutt til eitt øki, har tað verður reinsað. Saltið verður goymt úti, til tað verður selt. Á Ibiza hava vit tvær goymslur: onnur eitur Can Gorra ella Plaza Nueva (nýggja pláss) og hin eitur Pantano. Tá saltið er komið higar at liggja, er tað klárt at senda til brúkaran antin við skipi ella lastbilum, leyst í lastini ella í sekkjum.


*Her fer saltið í "mylluna".*


*Endaliga malingin av saltinum.*


*Hetta er endaliga goymslan, og hetta er salt, sum er klárt at verða avskipað til Føroyar.*


*Bryggjan hagani saltið verður avskipað.*

# Hildibjartur sagt farvæl

Hósdagin í seinastu viku var móttøka á Hotel Hafnia í samband við, at Hildibjartur Johansen hevur lagt frá sær sum stjóri á Lønjavningarstovuni. Hervið er ein long almenn tænasta komin at enda. Hildibjartur kom at arbeiða á lønjavningargrunnin fyri 44 árum síðani. Hann hevur tískil virkað undir øllum løgmonnum uttan tí fyrsta, Andrass Samuelsen. Og hann man hava virkað undir einum 20 landsstýrismonnum í fiskivinnumálum. Síðan fyrst í 1970-unum hevur Hildibjartur verið stjóri, tá hann avloysti Tórð Dalsgaard. Hildibjartur er annars bert 2. stjórin í meira enn 50 ára søguni hjá hesum stovni. Tað skal eisini sigast, at stovnurin er merktur av støðugum starvsfólki. Her eru framvegis fólk, sum hava arbeitt í 40 ár.

Lønjavningarstovan er tískil ein stovnur, sum hevur havt eitt serligt samband við øll fiskimannaheim í hálva øld. Og Hildibjartur hevur saman við sínum starvsfólki rikið stovnin á ein fyrimyndarligan hátt. Vit hava ikki altíð verið samdir, men hetta hevur altíð javnað seg.

Tað var nógv av fólki á móttøkuni. Her vóru fiskimenn, reiðarar, umboð fyri umsiting og ættarfólk og vinir. Tað vóru eisini fleiri røður hildnar. Fyrst takkaði Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, Hildibjart fyri hansara trúgvu tænastu. Síðan hevði Henrik Old orðið. Hann var í nógv ár formaður í nevndini fyri lønjavningargrunnin. Tað skal nevnast her, at aðrir drúgvir formenn í nýggjari tíð hava verið løgtingsmenninir Jógvan I Olsen og Poul Jacob Olsen. Henrik greiddi frá, at ofta hevur verið buldrasligt, ikki minst tá peningur hevur manglað í kassanum. Einaferð máttu nevndin taka upp lán fyri at útvega grunninum gjaldføri.

Óli Jacobsen bar eisini eina heilsan. Hann man vera ein av teimum, sum hevur havt allar mest við lønjavningargrunnin at gera gjøgnum mong ár. Hann greiddi eisini frá buldrasligum tilburðum, sum tá lønjavningargrunnurin fekk ordrar frá hægstu myndugleikum um at fremja lógarbrot, men nevndin noktaði. Hesum fekk hon eisini sína "tøkk" fyri. Nevniliga við at verða avtikin.

Óli heilsaði eisini nýggja stjóranum, Hanni Thomsen. Hann er hvalbingur, 56 ár, giftur við Maluni Norðberg, og tey eiga 2 synir, Hallur og Bergur. Hann hevur arbeitt á stovninum í eini 30 ár. Tað talar avgjørt til hansara fyrimun, at hann upprunaliga aftraði seg, tá hann fekk boðið stjórastarvið. Aðrir røðarar vóru Asbjørn Djurhuus og Jákup Sólstein.

Vit hava nakrar myndir frá móttøkuni.



*Herborg og Hildibjart.*



*Hildibjartur og Herborg við barnabørnum*



*Asbjørn Djurhuus úr Tjørnuvík heldur røðu.*



*Synir Hildibjart, Jón t.v. og Kári við konum.*



*Hanni er nýggi stjórin á Lønjavningarstovuni. Her saman við Annilenu og Gunnvør, sum hava arbeitt eitt mannaminni á stovninum. Tilsamans munnu tey hava arbeitt eini 100 ár fyri fiskimenn.*



*Henrik Old heldur røðu.*



*Jógvan Glerfoss t.h. hevur arbeitt nógv ár í Lønjavningargrunninum. Poul Johannes er beiggi Hildibjart.*



*Bjørn heldur røðu.*



*Kvinnurnar eru væl umboðaðar. F.v. Mia, Jenny og Katrin.*

*Framhald á síðu 17*

**Men hesar urtirnar, minnast tygum einki til?**

Jú, jarðarsiv hevði hon ímóti at koyra upp á fyri eksem, tá ið tey høvdu útbrot. Leitaði tað úr børnum ella haganum, og so traktaði hon tað. Hon lat tað liggja so og so leingi. So sílaði hon tað og goymdi tað. Men hvat hon so hevur koyrt í hetta fyri at bevara tað, ella at hon bara bevaraði tað, sum hon hentaði og traktaði sohvørt, veit eg ikki, men hon smurdi hetta yvir, og soleiðis hjálpti hon nógvum menniskjum. (Viðm.: Jarðarsivi, sigur mamma, liggur í jørðini, veksur upp, og tað er grátt.)

So var tað eisini eitt, sum hon brúkti óalmindiliga nógv, tað var rómi. Hon hevði feskan róma til sumt og súran til sumt. Tá tað nú var ein hond, sum bleiv hovin, so bant hon silkitráð. Hon hevði fyrst um skøvningin og so um her (hon vísir á hvar). So bleiv hon við, tá ið nú hol var á, at dríva tað omaneftir. Hon gníggjaði tað inn við hesum her rómanum. Og so legði hon blátt pappír uppá, sum tey tá brúktu – teir royktu so nógv blákardús. Tað bláa pappírið goymdi hon. Og tað vísti seg, sum sjúkan fór undan hesum. Fingrarnir kundu vera, sum eg veit ikki hvat, men tað galt um ikki at lata tað koma niðanum. Og so manereraðist hon aftur og fram og streyk og masseraði. Svullir og sovorðið. Sum um várarnar, tá ið hetta var so almindiligt, at menninir komu frá bátunum við hovnum hondum. So fór hon at massera og strúka.

**Bjargaði eyganum á Stellu-Pól**

Tað var bara eitt. Hon var ikki sterk kvinna, tí hon leið av astmu. Tað bleiv for nógv lagt fyri hana, tá ið sjúka kom fyri. Tí hon var altíð áheitt. Eg minnist sum smágenta, einaferð Stellu-Pól og eg fóru gangandi eftir vegnum, so stendur ein hundur á einari trappu. Hann æt Kammur. Eg fór til hansara, hann stóð so blíður og blinkaði, sum hundar ofta standa, og eg streyk niður eftir honum. Á, sum Kamm er fittur í dag. Eg royndi so at fara forbí. Stellu-Pól er aftanfyri, og hann sker í eitt kongaróp. Nú hevur hundurin høgt alt eygað niðurfrá. Eg sigi: "Oy-Jesus, Pól! Nú doyði tú!". "Ja, eygað kom út", sigur Pól, "hundurin beit meg". Eg leypandi niðan í Tungu eftir mammu og bað hana vælsignaða koma at hjálpa Pól, tí eygað var dottið út. So kom hon við stavinum húlkandi omaneftir. Eg minnist, at hon sigur við Pól, tá ið eg komi inn. "Pól, hvat hevur tú gjørt?". "Eg røri teg ikki, fyrr enn tú sigur mær, hvat tú hevur gjørt við hundin". "Jú, eg klípti hann í oyrað". Og so legði hon Pól niður og fór at vaska við hesum forskelliga. Hon hevði alt í einum lumma, eisini ein saks og ein lítlan sprettiknív Og tað minnist eg. Hon seymaði hetta uppaftur ímóti eygnalippuni við nál og tráð, men hvat fyri slag tráðurin var, dugi eg ikki at siga tær. Men eyga bleiv í ordan. Har kom einki annað til. Hann skuldi liggja og liggja og hava tvørturum, og hon sat og skifti á eyganum, so tað ikki skuldi hovna. Eygað á Pól bleiv í ordan. Men hann bar merki, inntil hann doyði.

**Hon hevur eisini verið eitt slag av jarðarmóður!**

Ja, tað skal eg siga tær. Tú trýrt ikki, hvat tey settu hana útfyri. Tí tað segði ein kona fyri mær, einaferð ein hevði stúrtning. Tey sendu boð eftir Marini, og hon royndi og hon royndi og hon royndi, og so fóru teir at enda inn til Klaksvíkar til doktarin, men for seint var, konan doyði í hondunum á henni. Tá kundi hon einki gera. Sovorðið bleiv hon útsett fyri. Men hvat hon lekti, var ógemeint. Eg visti, ein kona kom av Húsum og legði seg norður til Mikladals til Marina at passa sær ein fingur, tí hann var bólnaður so. Okkurt hevur verið, tí enntá smábeinini komu út. Fingurin bleiv heilur til endan, men sum omma tín segði mangan, tað var for nógv soleiðis at leggja seg inn á konuna.

**Omma arvaði hana í so máta?**

Hon hevði øðrvísi umstøður, tí hon kundi pátala sær doktarin. Zachariasen var óførur móti ommu tíni at senda henni eitt og annað, sum hon kundi brúka inni, bæði forbindingar og okkurt sovorðið, sum hann hevði á lagri tá.



*Hendan myndin er uml. 1938. Longst til vinstru eru lærarahúsini, síðan er tað sethúsini hjá Johan Petersen, Suðuri í Húsi. Beint við er handilin hjá Johan og síðan húsini hjá Karl á Brúgv. Upprunaliga handlaði Johan uppi á loftinum á sethúsum sínum. Handilin bygdi hann saman við Óla í Útistovu.*



*Hugnalig mynd úr Mikladali seinnapartin í 50-unum. F.v.: Matilda og Eivind Eliassen, Kirstin kona Eivind, Esther, Eyðbjørg Andreassen, úr Lorvík, Jónvá Guttesen, Margretha, Magnus úr Hússtovu og kona hansara Mathilda. Esther, Eyðbjørg og Margretha eru systrar. Eyðbjørg er gift við Heina Johan Glerfoss og Margretha var gift við Líggjas í Hússtovu, sum doyði herfyri.*



*Tveir spelknir Mikladalsdreingir. F.v. Jógvan í Norðnástovu og Eivind í Hússtovu. Báðir eru farnir. Húsini uppi í Tungu síggjast aftanfyri teir.*

Men hvat skuldu tey senda til Mikladals í gomlum døgum? Har var einki. Tað var einki uttan tað, sum tey funnu uppá sjálvi.

**Tá var doktari kortini Klaksvík?**

Hann kom ikki, fyrrenn omma tín var fødd, í hálvfjerðsunum hevur tað verið. Frammanundan skuldu tey til Havnar. Og meginparturin av fólkinum var deytt, tá ið tey fingu doktarin.

Eg var stødd í Mikladali, tá ið ein smágenta var fødd, sum nú er 70 (1976). Tá fóru teir úr Mikladali til Klaksvíkar eftir doktara. Tá teir komu til Klaksvíkar, nú er eingin doktari, nú er hann staddur í Havn, og so hava teir hoyrt tað, at leirvíkingar hava verið í Havn eftir doktara. So leggja teir á fjørðin yvir til Leirvíkar. Og tað blívur ódn á landssynningi, men teir komu til Leirvíkar. Tað er ikki brimpláss. So nú frætta teir har, at tað var Jóan Petur í Hússtovu, sum hevði verið eftir doktaranum. Hann fór til Havnar, og tað lukkaðist eisini hjá teimum at koma suður. Nú liggur ein trolari úti á redini í Havn, og doktarin sigur, hann fer ikki norður fyri bjørg við árabáti. Hann torir ikki. Og hann fær so hendan trolarin at koma norður við sær. Men sjómenn eru ikki so, teir fyltu bátin við gróti, og so fóru teir aftaná.

Nú teir koma norður til Leirvíkar, liggur ein bátur fyri har og bíðar eftir doktaranum. So má hann fyrst forloysa hesa konuna í Leirvík. Nú taka teir hann og føra hann til Húsar. Nú er myrkt, og eg minnist tann dagin, teir komu norður eftir oyggj í ódnarveðri við doktaranum, norður eftir Kalsoynni, gangandi í hálvmyrkri, við tveimum lyktum. Tá ið teir komu til hús, nú liggur konan í andaleypi við einari gamlari jarðarmóður, sum einki kundi. Nú kemur doktarin inn, og hann hyggur rundan um seg, ein neyðars lampa undir loftinum, hvar, hvør kundi hjálpa sær her, sá, hvussu vorðið var.

Hann var danskari og var ein nokkso trivaligur maður, tað søgdu teir. Bað geva sær okkurt. Ja, søgdu teir, teir høvdu einki at geva honum, bað teir geva sær gott kaffi og eina breyðflís við kjøti uppiá. Hann royndi at stappa niður í seg, meðan hetta neyðardýrið lá í andaleypi. Og so bleiv lagt á borðið. Tá var hon so langt niðurkomin, at hon kundi ikki bedøvast, hann tordi ikki. Hann bað teir frægastu menninar koma at hjálpa sær. Petur uppi í Tungu var annar maðurin, og Andrass í Útistovu var annar. Og hann setti á, spretti, og barnið kom við lívi. Tað søgdi hann, tað hevði hann ikki væntað. Men hon kláraði tað, mamman. Og hon segði tað fyri mær, at tað var í langa tíð, hon umsá seg at møta gamla Peturi og Andrass, tí hon visti, at hvør hevði hildið í sítt kjógv, tá ið hon føddi. Og einaferð spurdi eg pápa (Petur). Hann vildi einki siga, hann bara græt. Hann segði bara, at nógv kundi eitt menniskja halda út, áðrenn tað doyði, tað sá hann, men barnið kom við lívi. Eg hugsaði tað við mær, nú hon fylti 70 ár. So nógv er skett hesi seinastu 70 árini.

*Framhald á næstu síðu*

Dámdi ikki at skera

Men tað segði langabbi tín mangan, at Marin kundi gera nógv, men ikki dámdi henni at skera. Tá ið tað kom til tað, so mátti hann hjálpa henni. Einaferð var ein kona har norðuri, sum hevði fingið ilt í bróstið. Bróstið var blivið sum tvey, men Marin hevði roynt at fingið samlað tað í einum stað. So sigur hon soleiðis: "Nú heldur hon ikki út longur. Góði, gakk tú og sker hol á. Lat meg ikki síggja, meðan tú skerst. Eg skal leypa til, tá ið hol er komið á". Og hann setti á, har sum hann helt vera frægast. Hann segði, hann hevði ikki sæð sovorðið. Hann hevði eina spølkumma og legði hana undir. Bæði blóð og materia komu útúr. Tað var tann ekta materia. Og so bleiv Marin við so spakuliga at strúka og strúka og strúka. Og tey fingu lekt hana. Tonk, eitt bróst við øllum teimum nervunum, men konan bleiv reddað.

Hvussu við bedøvilsi?

Ánei, ánei, tað var einki við bedøvilsi. Og einki við at drepa bakteriurnar og alt hetta her, so Marin hevði tað soleiðis, at hon mátti sita uppi yvir konuni og royna at vaska og halda sárið reint, so hvørt sum tað rann, so tað stóð nógv á henni. Í tann rætning var Petur grúuliga hjálpsamur við hana.



*Bakkavegurin – fiskastykkið hjá Johan Petersen suðuri í Húsi til vinstru. Húsini f.v.: Suðuri í Húsi við smiðju og hjalli, Uttarstova, Útistova, á Brúgv, úti í Húsinum, Beitið, nøkur úthús og gamla kirkjan, Uppi í Tungu hómast í tveimum lonum.*

# Poul Andreas í Mikladali

Poul Andrias Petersen var føddur í Mikladali 9. Juli 1884. Hann var sonur Petur og Marin Petersen í Mikladali. Petur uppi í Tungu, sum faðirin var kallaður, var ættaður av Mýrini í Elduvík, og Marin, móðirin, var ættað úr Útistovu í Mikladali.

Petur uppi í Tungu legði gerði inn í Mikladali, og sama ár setti hann kálv við, og sagt er, at so dúgliga velti hann, at hann føddi kúnna av gerðinum, sum innlagt varð sama árið, sum kúgvin varð kálvað.

Soleiðis var Petur av raskastu og skjótførastu monnum, bæði til fjals og fjøru, og sonurin gav honum so lítið eftir í so máta. Áðrenn Pól Andrias gjørdist sjúkur, var hann av raskastu monnum og tiltikin at vera ráðsnjállur. Marin, mamma hansara, var sum ein hálvur lækni í bygdini, og Pól Andrias fekk gávurnar frá henni. Góður var hann í ávikum, og var nakað ámannafatt í bygdini, so var at senda boð eftir Pól Andriasi, og hann var altíð fúsur at koma.

Men Pól Andrias misti tíðliga heilsuna, og tey seinastu árini vóru likamsevnini so vánalig, at tað bar lítið til at vera frammi. Men ondsevnini vóru tey somu, og tó at tað bar illa til at halda um pennin, sum fingrarnir vóru kropnaðir, so fór hann kortini í holt við at skriva upp ymist, sum honum var fortalt, ella sum hann sjálvur mintist um Mikladal. Hetta tilfar lá eftir hann, tá ið hann doyði, og tey, sum eftir hann sita, avgjørdu at lata tað út í bók, sum Marius Johannesen og Bette Rasmussen skipaðu fyri. Henda lýsing av Poul Andreas er úr fororðinum hjá Marius.

Her eru nøkur brot úr bókini, sum hava samband við tey evni, sum Lisa lýsir.

Bátasmíð

Tað hevur verið bátasmíð í Mikladali heilt frá gamlari tíð. Tó mest í 18. og 19. øld. Tá vórðu bátar gjørdir í Mikladali til allar oyggjar í Føroyum, og vóru næmingar har nógvastaðni frá. Til dømis vóru Hans Jacob Hjelm sunnan úr Vági og ein úr Skálavík, kallaður Sandoyar Jóannes, og Herman Mørkøre av Eiði. Teir lærdu í seinnu helvt av 19. øld og fóru aftur til sínar heimbygdir og smíðaðu nógvar bátar. – Maður úr Norðnástovu giftist eisini úr Mikladali til Svínoyar. Hann var bátasmiður og eisini sonurin eftir hann; og handalagið skínur ígjøgnum allastaðni, eisini í Koltri – eg veit ikki betur, enn at Niklas í Koltri hevur lært hjá pápa sínum, og pápin smíðaði bát til Jógvan í Norðnástovu. Abbi Niklas var slektaður úr Norðnástovu og varð kallaður Karl í Norðnástovu. – Hanus í Norðnástovu bar orð av at gera bát millum svøvnar; men sannleikin var tann: Hann var á Syðradali og gjørdi eitt fýramannafar.

Hásummar var, og Hanus var ikki í song, frá tá hann byrjaði, og til báturin stóð liðugur. Hann hvíldi seg í høvlispønunum um hádimmið; men drongurin, ið hjálpti honum, var øll dimmini í song. Tað var um hetta tíðarskeið, at áttamannafar var bygt á Kópafløttinum. Ein gamal fjákutur drongur var tá í Mikladali. Ein dagin, hann kom á Kópafløttin, skar hann í at syngja:

*Gør skuden både våd og tung,*
*og lad den aldrig gange.*
*Når otte mand ror fast på den,*
*lad den som kletten stande.*
*Og når den sejlet bruge skal,*
*lad den som landstamp rulle,*
*og snarlig ende bunden op.*
*Det ønsker Pal til fulde.*

Tá hann segði tað seinasta, tók hann foldaðar hendur upp um høvdið; men tá tók bátasmiðurin øksina og fór eftir honum, og tann gamli drongurin helt undan.

Hans Jacob Eriksen, sum festi Uttarstovugarðin 24. januar 1859, lærdi at smíða bátar hjá mammubeiggja sínum í Norðnástovu. Teir næmingar, sum eru nevndir frammanundan, lærdu allir hjá Hans Jakku, og tá vóru nógvir bátar gjørdir í Mikladali. Heini uppi í Tungu og Jógvan í Norðnástovu lærdu hjá honum í endanum av 19. øld.

Læknahjálp

Læknahjálp var ikki altíð løtt at koma til; men tað hevur altíð verið onkur, sum hevur havt bøtandi hond. Í 19. øld var tað ein kvinna, sum hevði sera gott handalag at hjálpa sjúklingum. Hon var heilt ung, tá ið hon røktaði ein ringan tummilfingur hjá Katrin úti í Húsinum. – So ein dag varð hol gjørt á, og út kom ein ónatúrliga stór rúgva av blóði, materiu og smá beinsplintur. Tá vildi mótið ganga frá tí ungu gentu, men Katrin, sum tá var heilt gomul, sigur: "Hvat nú? Lat renna! Lat renna!" Tá ernaðist tann yngra og fekk reinsað út og bundið um. –



*Poul Andreas f. 1884 uppi Tungu, 1884-1957, og konan Poulina, ættað úr Kvívík. Tað sigst, at Poul Andreas hevði nakað av somu evnum sum mamman Marin. Tað sama høvdu hini systkini. Jógvan á Nesi greiðir frá, at tá Rosenmeyer Wolles á Trøllanesi datt oman í 1911 og breyt beinið, var tað Poul Andreas sum setti beinið so væl saman aftur, at einki merktist aftaná. Tað kann verða nevnt, at abbasonur hansara Jákup Petersen er ortopedur, so hetta er eisini farið í arv.*

Fyrst í 1880 varð Absalon á Trøllanesi stangaður av tarvi millum Húsar og Syðradal og heilt illa farin. Hann kom undir læknahond; men tá nakrir dagar vóru umlidnir, sendi læknin hann til Mikladals at passa, og alt gekk væl. – Í 1890 var maður fyri tí óhappi at sláa seg á tummilfingurin á vinstru hond og knústi hann. Áttamannafar við honum til Klaksvíkar beinanvegin. Læknin bant um og sendi hann norð til Mikladals at passa. –

Hon tók ímóti nýføðingum – ikki so fáum – tí ikki var altíð skjótt at fáa jarðarmóðir. – Í teirri tíðini var tað vanligt, at kommununar lótu kvinnu fara niður at læra til jarðarmóðir. Norðoya kommuna sendi eina úr Mikladali, og hon var skyldug at verða í sóknini. Hon var bóndadóttur úr Uttarstovu og giftist við Símuni, sum festi Innistovugarðin á Trøllanesi 15. apríl 1854. – Hon var ljósmóðir í Mikladali í 1884 – tað var dreingjabarn, føtt 9. juli 1884.

Jákup Ziska Olsen, sum festi Innistovugarðin 12. januar 1842, og Hans Jákup Eriksen, sum festi Uttarstovugarðin 24. januar 1859, fóru ein dagin burtur í haga, heim um Enni. Nógvur var kavin, og tá teir komu heim at tí norðara gilinum, leyp skalvurin út av klettinum og niður í Kassin í rókini, sum gongur undir Ennirókini. Ziska var leysur av kavanum; men Hans Jákup var ikki at síggja. Ziska leitaði og rakti við ein fingur og fór at royna at fáa kavan burtur. Jú. Tað gekk. Ziska átti – um so verður sagt – ómenniskjaligar kreftir. Hans Jákup var púra í ørviti; men Ziska leiddi hann út úr tí smølu rók og nógva kava. Tað var eitt ódnartak at fáa Hans Jakku til hús. Høvdið var skalað – so mikið stórt brot, at tað sást væl til tað, tá hann í ellisárum hevði mist hárið. – Eingin lækni ella lærd hond, bara tey heima; men Hans Jákup hevði nógvar lívskreftir. Hann var eins og Ziska bæði stórur og prúður.

Úlvajarn var ikki í bygdini. Skuldi ein hava úlv kliptan, so var at ganga til Húsar. Koppar vóru fleiri, og tað var nokk so nógv brúkt at taka blóð av. Fyrst varð hakkað við einum hárkvøssum knívi, síðani varð koppurin niðurásettur. Koppurin var helst av neytahorni, og hol var borað ígjøgnum stikulin. Gjøgnum holið varð koppurin sogin fastur niður á handabakið og bleytt roð lagt niðuryvir. Koppurin varð standandi, til hann sleppti, fullur av blóði. – Tað hjálpti nógvum, sum høvdu frostblóð, frosthendur og frost í fótinum.

Bleytt roð varð nógv brúkt hjá teimum, sum tóku sær av skaðatilburði.

# Formaðurin hjá donsku fiskimonnum, Thorkild Førby, deyður

Danska fiskivinnan fekk ein rættiligan hvøkk næstseinasta leygardag, tá tað frættist, at formaðurin í Danmarks Fiskeriforening Thorkild Førby knappliga var deyður, bert 57 ára gamal. Hann hevði kvøldið fyri luttikið í hátíðarhaldi í samband við, at Thyborøn Havn Fiskeriforening fylti 75 ár. Hann gisti á sjómansheiminum í býnum og morgunin eftir var hann funnin deyður av hjartatilburði.

Førby náddi bert at vera formaður í hálvt annað ár. Tað var í apríl 2003, at hann tók starvið eftir tann rættuliga fýrkantaða Bent Rulle, sum hevði rent seg fastan.

Danska fiskivinnan var og er í stórari kreppu, eins og tað eru stór mótstríðandi áhugamál í felagnum, sum umboðar alt frá jolluveiðu til stór kraftblokkaskip. Hildið varð, at hesin sinniligi vestjydin var tann rætti maðurin at halda saman uppá felagið. Men sjálvt hann var við at koma í rasshaft. Lokalfeløg høvdu sagt seg úr felagnum, og tað skuldi havt verið eykalandsfundur í felagnum seinasta leygardag við m.ø. misáliti á felagsleiðsluna á skránni. Í staðin fór formaðurin til gravar dagin fyri, og fundurin er útsettur til 27. november. Tað hevur uttan iva staðið nógv á manninum, sum annars ongantíð bant frið. Hansara fartelefon var opin alt samdøgrið, og hevur hetta ikki gjørt tilveruna lættari.



*Thorkild Førby var formaður í Danmarks Fiskeriforening.*

Felagsblaðið hjá Danmarks Fiskeriforening, Fiskeritidende, er komið út við eini serútgávu, har minningarorð eru um farna formannin, m.a. frá starvsfeløgum og frá danska fiskimálaráðharranum Hans Chr. Schmidt. Førby verður lýstur sum ein heiðursmaður í odd og egg. Hann var fyrst og fremst fiskimaður, men boð vóru send eftir honum fyrst í Hanstholm Fiskeriforening, og síðan í meginfelagnum hjá donskum fiskimonnum. Hann royndi at aftra seg, men føldi eisini ein slíka ábyrgdarkenslu, at hann vildi ikki bera seg undan.

Hann var eisini út fyri ósakligum álopum, og hetta nívdi hann nógv. Men drotningin virðismetti hann, tí beint áðrenn hann doyði, fekk hann riddarakrossin, og hetta var hann sera fegin um.

Vit vilja eisini vísa okkara samkenslu við familjuni og annars eisini donsku fiskimonnunum, nú teirra fremsti róðurgangari er farin.



*Brynjálvur Petersen t.v. er ein gamal skipari. Martin Kruse arbeiðir hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni.*



*Hesi eru gomul í garði í Fiskimálaráðnum. F.v. Katrina, Andras og Marjun.*



*Jákup Sólstein heldur røðu.*



*Kitty er kend á Hafnia, og er ein av teimum, sum er við til at gera eina slíka móttøku so væleydnaða. Abbi hennara, Kristian Olsen, var í nógv ár stjórnarlimur í FF.*

SAXO'FØN
TLF. 31 68 08




Við okkurt um 25.000 ymiskum vørum á hyllunum, stendur landsins størsta goymsla av eykalutum til taks hjá føroyska flotanum. Aftanfyri stendur eitt samtak av trimum føroyskum skipasmiðjum og einum mekaniskum verkstaði, ið hevur meir enn seksti ára royndir innan veitingar til skipaflotan – alt frá smærri umvælingum og viðlíkahaldi til um- og nýbygging av skipum.

Góðkendir tænastuveitarar av:
Wärtsilä
Deutz-MWM
Scania & Valmet
Callesen
Ulstein Brattvaag
ABB-Turbochargers
Desmi pumpum

stephanssons hús

**P/F Tórshavnar Skipasmiðja**
Tlf. +298 31 11 55
Fax +298 31 11 25
e-mail: info@faroeyard.fo

**P/F Skipasmiðjan á Skála**
Tlf. +298 44 11 55
Fax +298 31 44 25
e-mail: skala@faroeyard.fo

**Vestmanna Skipasmiðja**
Tlf. +298 42 40 10
Fax +298 42 40 05

**Runavíkar Mekaniski Verkstaður**
Tlf. +298 44 70 36
Fax +298 44 78 34

www.faroeyard.fo

# Altjóða skipaskráseting

## Á ráðstevnuni um FAS seinasta fríggjadag hevði Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í sjóvunnumálum, hesa framløgu:

Panama
Liberia
Grikkaland
Bahamas
Hong Kong

Hesi fimm londini hava í hvussu er ein felagsnevnara, øll bjóða tey fram eina tænastu, sum kallast **"altjóða skipaskráseting"**. Hesar skipaskráir, sum eru tær størstu í heiminum, eru líka so ymiskar sum londini eru. Tað er ikki so løgið, tá hugsað verður um, at talið á skipum yvir 100 tons í øllum heiminum liggur um 90.000, ið øll sambært altjóða lóg skulu vera skrásett og sigla við einum tjóðarflaggi.

Sjálvt um skipaskráseting í høvuðsheitum er einføld og lík, so er tænastan, ið er knýtt at eini nýmótans skipaskrá, fjølháttað og krøvini mong og ymisk.

Til hvørja skipaskrá í heiminum er knýttur ein ávísur kundahópur. Skráir eru við stórum kundahópum, meðan aðrar hava ein minni hóp. Hetta, við ymiskum kundahópum, gevur eisini eina ábending um, at tað ikki er nakað einfalt svar uppá, hvussu ein skipaskrá skal ella kann síggja út.

Hevði tað verið EIN sannleiki, høvdu øll heimsins reiðaríir valt somu skipaskrá, men so er ikki.

### Sum tá kvinnan velur mann!

Á sama hátt, sum menn velja konu – ella sum nú á døgum har tað kanska í flestu førum er kvinnan, ið velur sær mann – útfrá ymiskum treytum, soleiðis hava reiðarar eisini ymisk ynskir um, hvat ein skipaskrá skal innihalda, fyri at hon skal uppfylla júst teirra tørv.

Eitt nú eru japanskir reiðarar glaðir fyri at skráseta síni skip í Panama, meðan grikkum dáma best sína egnu skipaskrá.

Orsøkirnar eru mangar, og helst verður ógjørligt at vita júst hví eitt nú reiðarí í Onglandi velja Liberia fram um Bahamas.

Reiðarar á altjóða skipaskrásetingarvøllinum hava ongan áhuga í at vita, hví skipanin er sum hon er, einans at hon virkar sum hon skal og er til fyrimuns fyri viðkomandi reiðara.

Tað, sum er felags fyri øll reiðaravirkir er, at raksturin fyrst og fremst skal hanga saman, men endamálið er sjálvsagt, at niðasta linja í roknskapinum skal vísa eitt so stórt yvirskot sum gjørligt.

### Eyka inntøkubein

Síðani 1992 hava vit havt FAS-skipanina í Føroyum, sum okkara íkast til eina altjóða skipaskrá. Í seinastuni hevur eisini verið róð upp undir, at vit áttu at fingið eina alternativa skipaskrá og harvið givið føroyska samfelagnum eitt eyka inntøkubein at standa á.

Skemtandi kundi verið sagt, at hevði ein í dag fingið hug at bjóða føroyska samfelagnum ein lítlan, ella ein at ganga uppá, sum onkur plagar at taka til, so hevði ikki verið møguligt at bjóða ein uppá hitt beinið, sum annars er gamal siður. Tí, sum støðan er í dag, hevur samfelagið stórt sæð bara eitt bein at standa á, og tað er framvegis fiskivinnan.

Hetta skal sjálvandi ikki skiljast sum nøkur niðurgerð av týdninginum, sum fiskivinnan hevur fyri okkum. Heldur ikki skal hetta skiljast, sum ein boðskapur um at rættast hevði verið at minka um fiskivinnuna. Nei, hetta skal skiljast, sum ein boðskapur um, at tað verður neyðugt at gera samfelagskøkuna størri, soleiðis at aðrar vinnur koma at umboða størri og størri part av okkara lívsgrundarlag, og her er tað, at sjóvinnan eigur at verða tikin við sum ein partur, um tað á nakran hátt er møguligt at koma fram til eina skilagóða skipan.

### Kunnu fáa eina vælvirkandi skipaskrá

Sjálvandi kunnu vit í Føroyum fáa eina vælvirkandi altjóða skipaskrá, ið kundi kropið høgt upp eftir listanum fyri mest nýttu skipaskráir í verðini. MEN, ein **vælvirkandi** altjóða skipaskrá er ikki nakað, ið bert verður rist úr ermuni, tí her krevst servitan, royndir, tíð og møguliga eisini pengar.

Eg havi altíð havt ta áskoðan, at har til ber at skapa nýggjar møguleikar fyri vinnum, við t.d. broyttum lógarkarmum, har hevur myndugleikin skyldu til at gera sítt til, at hesir møguleikar kunna realiserast.

Enn hevur tað ikki víst seg at verið so einfalt at fingið eina nýggja vælvirkandi altjóða skipaskrá at virka, sjálvt um summi vilja halda, at arbeitt hevur verið við málinum leingi.

Spurningurin er so, hví vit ikki hava eina skipaskrá sum telist millum tær bestu? Tað einfaldasta svarið kundi ivaleyst verið, at lítil politiskur vilji hevur verið til staðar. Tað kann væl hugsast, at tað hevur skortað uppá politiskan vilja, men eg trúgvi eisini, at tað eru aðrar orsøkir.



*Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, heldur røðu.*

Áðrenn vit kunnu fara undir at fyrireika sjálvt lógarverkið til eina altjóða skipaskrá, er neyðugt at hava hesi høvuðsatlit í huga:

1. Marknaðurin, – vit eiga at gera eina marknaðarkanning fyri at finna út av, hvat reiðararnir ynskja, og hvørjar vit vilja hava og møguliga ikki hava?
2. Politiski veruleikin, – hvør er tann politiski veruleikin í Føroyum, og hvussu langt kunnu vit fara fyri at náa settum málum?

Ikki einans eru skip og reiðarar ymisk og teirra tørvur fjølbroyttur, men tað eru eisini ein mongd av altjóða skipaskrásetingum at kappast við um tey áðurnevndu 90.000 skipini, tí er neyðugt at finna ein málbólk, ið hóskar til okkum.

Tað er vónleyst at hugsa sær, at tann nýggja føroyska altjóða skipaskráin beinanvegin fer at megna at fáa nógv skip skrásett í Føroyum. Við eini marknaðarkanning kunnu vit finna út av, hvør okkara málbólkur kann vera, og hvørjari tænastu málbólkurin er áhugaður í. Tá vit so hava fingið málið í eygsjón og funnið fram til, hvørjum vit skulu egna við er eftir at gera málið politiskt búgvi. Síðani má línan setast við so mikið av snildi, at onkur fer at nærkast og vónandi bítur á.

Kunnu vit fáa eina skipan sum kastar av sær í Føroyum, uttan at hon setur kílar í verandi skipanir og samstundis er ein fíggjarligur styrkur hjá reiðarum, hava vit funnið loysnina.

Verandi altjóða skipaskrásetingar bjóða støðugt teirra kundum betri treytir. Hetta merkir, at skulu vit kappast verður neyðugt við einari tryggari, einfaldari, skjótari, fjøltáttaðari og bíligari dygdartænastu. Og ikki minst skipanin skal halda politiskt.

### Marknaðarkanning

Í Fiskimálaráðnum hevur verið arbeitt við, hvussu ein marknaðarkanning kann gerast og tankar hava somuleiðis verið frammi um møgulig alternativ til okkara núverandi FAS-skipan.

Tá ráðstevnan er av, fari eg saman við landsstýrismanninum í fíggjarmálum at taka samanum og seta hol á eina ætlan fyri, hvussu arbeiðið kann leggjast til rættis frameftir.

Vit fara at lurta eftir teimum við royndum innan altjóða skipaskráseting og lata teirra royndir og eginleikar koma okkum til fyrimuns og harvið hjálpa okkum at røkka eini niðurstøðu.

Fiskimálaráðið hevur ásannað, at altjóða skipaskráseting og skipaeftirlit er tengt at hvørjum øðrum, og hava Skipaeftirlitið og Skipaskrásetingin sostatt havt eitt sera tætt samstarv tað síðsta árið, og møguliga fer hetta samstarv at verða styrkt enn meira í framtíðini.

At enda fari eg at takka fyrireikarunum fyri at hava tikið stig til hesa ráðstevnu, fyri teirra áræði og alla ta tíð og ta orku teir hava lagt í at fáa hetta í lag.

Tað er hugaligt, at Sjómansskúlin av sínum eintingum fer undir eitt átak sum hetta, fyri, sum tað sæst av lýsingini innbjóðararnir geva av ráðstevnuni, at skapa størri grundarlag fyri virkseminum á skúlanum, samstundis, sum ein lokkandi føroysk altjóða skipaskrá eisini kemur at hava stóran týdning fyri samfelagið sum heild.

Spurningurin er í mínum hugaheimi so áhugaverdur, at hann eigur at viðgerast út í æsir – sjálvandi í einum positivum anda.



*Fitt av fólki var á ráðstevnuni.*

# Myndir frá Ånstad

Vit endurgeva aftur nakrar av forvitnisligu gomlu myndunum hjá Olov Ånstad, sum kom higar fyrstu ferð í 1948, og sum aftur var her í summar.

Fólk dáma væl hesar myndir og í flestu førum kennist onkur við fólkini á myndunum. Veit onkur meira um hesar myndir vilja vit fegin frætta:



*Harald Falk var ein kendur svenskur føroyavinur, sum helt hundraðtals fyrilestrar í Svøríki um Føroyar. Hann var fuglafrøðingur og sæst her við einum lunda.*



*Frelsunarherurin á Vaglinum.*



*Samb. tekstinum er hetta skúlalærarin á veg í bergið. Hvør er hann?*



*Hvør man hesin gamli vera?*



*Henda hjálpir fotografinum. Men hvør er hon?*



*Hvør er hesin?*



*Hetta man vera í Dímun. Men hvørjar eru hesar?*



*Heim av fuglaveiðu í Mykinesi.*



*Børn í Kirkjubø samb. tekstinum aftanfyri myndina.*



*Børn í Dímun.*

# Fiskivinnuvitjan úr Norðurírlandi

Sigast kann, at føroyska fiskivinnan hevur skapt stóran áhuga í Bretlandi. Seinasta árið hevur ein hópur av sendinevndum verið í Føroyum at kunna seg um okkara skipan sum heild og ikki minst at kunna seg um okkara fiskidagaskipanina.

Í seinastu viku var aftur ein sendinevnd í Føroyum. Henda sendinevndin var úr Kilkeel í Norðurírlandi. Vitjað varð á øllum stovnum, sum hava við fiskivinnu og fiskiskap at gera, so sum landsstýrismannin í fiskivinnumálum, fiskifrøðingar, reiðarafelagið, MÚ, fiskamarknaðin og ráfiskaseljarafelagið. Teir vóru tó ikki heilt ókendir við føroysk viðurskifti, tí Jørgen Niclasen hevði verið á leiðini hjá teimum á eini av sínum "missiónsferðum" at boða føroysku fiskidagaskipanina.



*Sendinevndin á skrivstovu FFs: Frá vinstru Allan Cahambers, Allan Mc Culla, Pieter-Jan Schou og Jón Kristiansson.*

Hesi vóru við á ferðini í Føroyum:

– Alan Chambers, formaður í ANIFPO
– Alan McCulla, stjóri í ANIFPO
– Pieter-Jan Schon, fiskifrøðingur frá havgranskingarstovninum í Belfast, ið situr í ICES arbeiðsbólkum.
– 2 mans frá BBC
– Jon Kristiansson, fiskifrøðingur úr Íslandi.

Um orsøkina til vitjanini kann í stuttum sigast, at fiskiskapurin í Írska havinum er minkaður niður í onki av ymiskum orsøkum, og hetta hevur verið til stóran skaða fyri tey økini, sum eru rakt av hesum. ES hevur játtað Anglo North-Irish Fishproducers Organisation (ANIFPO) pening at fáa lýst støðuna, og verður hetta gjørt í samstarvi við BBC, ið skal fylgja monnunum frá ANIFPO á eini ferð í Norðurírlandi og Føroyum, har samanberingar verða gjørdar millum støðuna í ymsu økjunum.

Sendinevndin vitjaði eisini fiskimannafelagið og fekk ta kunning, sum vit hava tøka, og sum vit eisini góvu bretska fiskimálaráðharranum, tá hann var í Føroyum í september mánaði.

Men vit fingu eisini eitt sindur at vita um fiskiskap í Norðurírlandi. Har eru trý stór fiskivinnusamfeløg, og Kilkeel er tað størsta við einum fólkatali upp á 6.500 fólk, so tað samfelagið líkist Klaksvík.

Umrøddi felagsskapur hevur umleið 60 bátar sum limir, og hesir fiska fyrst og fremst í Írska havinum, men teir umboða eisini skip, sum eru á uppisjóvarveiðu, og sum fiska í Norðsjónum og Biskaia víkini.

Árliga landingarvirðið hjá Norðurírlandi er um 350 milj. kr. Tað, sum mest verður veitt av, er hummari o.t. og 90% av hesum verður útflutt. Innflutningurin av feskum fiski er vaksandi, m.a. innflyta teir rundan fisk o.a. úr Føroyum!

Í Norðurírlandi eru 135 fiskifør, sum eru longri enn 10 m, og 170 sum eru smærri, so tey eru eini 300 tilsamans. Miðalaldurin á flotanum er 34 ár.

Við hesum flota eru 650 fiskimenn og 1.000 fólk arbeiða í fiskiídnaðinum á landi. Umleið helvtin av arbeiðarunum í fiskivinnubygdunum arbeiða í fiskiídnaðinum. Tó koma fleiri og fleiri arbeiðarar eystanífrá.

Trupulleikin hjá fiskimonnunum í Norðurírlandi er ikki tørvur á fiski, men skipanin av fiskiskapinum. Sum skilst halda teir ikki her, heldur enn aðra staðni, at samsvar er ímillum almennu fiskifrøðina og ta veruligu støðuna hjá stovnunum. Men mótsætt skotskum fiskimonnum geva teir ikki ES skuldina. Ráðgevingin er nevniliga tann sama uttanfyri ES sum innanfyri.

Úrslitið er ein støðug minking av veiðumøguleikunum. M.a. er TAC'ið á toski síðan 1994 farið úr 6.200 tonsum niður í 2.150 tons uttan at hetta hevur bjargað toskastovninum. Hýsukvotan er farin upp, men hon kann illa fiskast, tá so stórar avmarkingar eru fyri toskin.

Spurningurin er so hvat kann gerast. Tað er neyðugt at broyta fiskivinnupolitikkin hjá ES, so avgerðirnar kunnu takast fyri hvørt øki sær, t.v.s. regionalt. Tað fer ikki at bera til, at veiðan verður fjarstýrd úr Bruxelles. Eisini er neyðugt at endurskoða fiskifrøðina, so hon verður meiri í samsvar við verunleikan í havinum.

Nú er tað ein góður spurningur, hvussu nógv kann lærast í Føroyum á hesum økinum, men sum tað skilst, hava teir í hvussu er fingið onkran íblástur.

Vit spurdu eisini norðurírarnar, um tað er friður í landinum nú. Tað játtaðu teir. Tað er í hvussu er góð tíðindini.

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

Pf. Petur Larsen

Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

AGN



sild / kúfiskur
makrelur
høgguslokkur
einkultfryst gágga

hava dagligt samband um alt landið

P/F KAMBUR

STRENDUR - telefon: 447720
ella 448095 - fax: 448744

SENT VERÐUR VIÐ STRANDFERÐSLUNI

SKIPSTIMBUR & APTERING



Vit átaka okkum alt arbeiði innan skipstimbur og aptering, so sum nýggja messu, brúgv ella lugar.

Sp/f Skipstimbur og aptering

v/Jón Jacobsen · FO-470 Eiði · Tlf: 22 23 86

# Bjargingarútgerð
## á sjógvi og landi



*Vit bjóða tað besta innan bjargingarbátar, bjargingarvestar, eldsløkkiútgerð, bjarginar og trygdarútgerð.*
*Umboð fyri kenda danska merkið "Viking".*

- *Bjargingarbátar*
- *Bjargingarnet*
- *Yvirlivilsisdraktir*
- *Flótidraktir*
- *Bjargingarvestar*
- *Bjargingarkransar*
- *Epirbar/neyðsendarar*
- *Radartranspondarar*
- *Eldsløkkjarar*
- *Eldávaringar*
- *Branddraktir*
- *Umvælingar*
- *Eftirlit*

**P/F Gummibátatænastan**
Mannaskarð 4, Postboks 3223, 110 Tórshavn
Tel. 31 49 13, Fax 31 06 56, E-mail: gummibad@post.olivant.fo

J. PATURSSONAR GØTA 18




SAXOFØN
TLF. 31 68 08

# MAN B&W Diesel A/S

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64

# Bláкrossheimið

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar og avvarandi teirra.

Hevur tú ella onkur tú kennir trupulleikar við rúsdrekka ella rúsevnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Blákrossheimið á tlf. 315575, sum svarar alt samdøgrið.

***Vit kunnu m.a. bjóða...***

- ***avrúsan og viðgerð***
- ***einstaklinga samrøður (ambulant viðgerð)***
- ***samrøður saman við familjuni (familjuviðgerð)***
- ***eftirviðgerð - búpláss í búfelagsskapi***

Øll starvsfólkini á Blákrossheiminum eru yrkisfólk og alt fer sjálvandi fram í trúnaði.

***Vit vilja fegin hjálpa tær***

**Blákrossheimið** FO-100 Tórshavn
Lynggøta 12 Tlf. 31 55 75




**Vit framleiða:**
Flótilínu ◆ Spunpolyesterlínu ◆ Reyða línu
Terylene/Danlinelínu ◆ Reina Terylenelínu
Hvítar, reyðar, bláar og svartar teymar nr. 4-20

Línurnar fáast úr 3,5 til 9 mm. Longd millum svøvlarnar eftir ynski.

Teymarnir fáast órippaðir ella rippaðir við húkum í ymiskum støddum.

Vit hava eisini klæðir til fiski- og arbeiðsfólk frá innast til uttast.

◆◆◆*vælkomin inn á gólvið*

**SNØRISVIRKIÐ**
**í Klaksvík**
**Tel. 455254 - Fax 457254**
**www.snorisvirkid.fo**

**TEYMAVIRKIÐ**
**í Runavík**
**Tel. 473000 - Fax 473001**
**www.teymavirkid.fo**

VAST ✓ 451171

**Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá**

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

***Sp/f Contrive Jsp Ltd.***
**FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945**

# Manning á "John Bull"

Vit hava nú fingið at vita allar menninar á myndini í seinasta blað, og vit vita eisini at myndin er tikin í Keypmannahavn, har skipið hevur landað.




1. Berlin Mikkelsen, Syðrugøtu.
2. Johan Jacobsen, hjá Antines, Klaksvík.
3. Dávur í Gerðum, Klaksvík.
4. dani.
5. Hans J Frederiksen, Uppsølum.
6. Jóan P Klein, Hattarvík.
7. Sámal Petersen, Mikladal.
8. Jóan Magnus Høgnesen, Klaksvík.
9. Poul Joensen, Klaksvík.
10. Óli Fredrik Joensen, Klaksvík (beiggi Robert).

Um John Bull verður sagt í Havið og Vit:



*"John Bull" á veg inn móti Keypmannahavn í 1921.*

Brøðurnir Jógvan og Karl á Høvdanum á Strondum keyptu í 1914 saman við J.F. Kjølbro sluppina John Bull úr Íslandi. Strandabrøðurnir áttu aðra helvtina og Kjølbro hina. Hon var fyrsta slupp við motori á Klaksvík – 24 hk Tuxham, men hann var úrtikin beinanvegin, og sigldi hon uttan motor til 1923. Karl á Høvdanum, sum hevði búsett seg í Klaksvík um 1910, førdi hana tey fyrstu árini. Várið 1921 keypir Dávur í Gerðum hálvt skipið frá Jógvan og Karl, og nú eiga brøðurnir Dávur og Jógvan Kjølbro hana. Dávur førdi so John Bull í eini seks ár, og tað má vera frá hesi tíðini at myndin stavar. Seinni førdi t.d. Símun á Polo og Jóan Símun Danielsen hana. Veturin 1922-23 fekk John Bull ísettan motor aftur, og er hetta fyrsti motorur, sum verður ísettur slupp her á plássinum. Tað varð gjørt meðan skipið lá á floti. 20. august 1939 varð skipið á veg til Íslands ásiglt av norskum báti "Reykjanes" og fórst, men manningin bjargaðist.

# Nýggj mynd frá Fornminnissavninum




*Hvørjir eru hesir?*




# Tjóvagósið broytti tjóvin

Tí at eg skammist ikki við gleðiboðskapin, tí at hann er Guds kraft til frelsu fyri hvønn tann, sum trýr.
*Rom.1,16*

Mong trúgva ikki bíbliuni, tí hon skal verða torskild, ótíðarhóskandi, óálítandi og samsvarar ikki við nútíðar heimsspeki, livihátt ella mannahugsan.

Bíblian er ikki løtt at skilja. Hon lagar ikki boðskapin eftir, hvat heimsspekin ella nútíðarmenniskjuni meina, gera ella siga.

Tað finst eingin "poppútgáva" av bíbliuni. Kortini er hon "Guds álítandi orð" til øll menniskju, til allar tíðir.

Í og við Bíbliuni stígur Gud inn í henda heim og talar til høgru og vinstru.

Gud vildi, at bíblian skuldi siga tað hon sigur, sjálvt um meir enn 30 fólk hava skrivað tær 66 bøkurnar við 30.442 ørindum, gjøgnum uml. 1500 ár.

Stutt sagt, Bíblian er gudinblást,.. tí menn frá Gudi talaðu, drivnir av heilagum anda.

Tí reisa vit okkum, við virðing, tá lisið verður upp úr henni.

Tí er hon eisini mest lisna og mest týdda bók í heiminum.

Høvuðsendamál bíbliunar er, at "gera teg vísan". Ikki vísan í lívfrøði, stjørnufrøði,... tí tað hevur Gud latið upp í hendurnar á mannaættini at finna út av.

Bíblian skal gera teg "**vísan til frelsu** við trúnni á Krist Jesus" 2 Kor.3,15.

Boðskapurin um Jesus, um vegin til frelsu, er tann reyði tráðurin gjøgnum bíbliuni.

– Bíbliuorðið verður ikki livandi fyrr enn tú byggir teg inn undir tað, og bara hevur eitt ynski: at Gud í náði síni vil lata meg fáa allan sannleikan at vita um syndir mínar, og um frelsuna í Kristusi. Fyrst tá byrjar Gud at tala- Bo Giertz.

Gleðiboðskapurin er Guds kraft til frelsu fyri hvønn tann, sum trýr.

Milliónir vitna hetta, harímillum er tjóvurin frá Costa Rica, sum danska Bíbliufelagið skrivaði soleiðis um:

Starvsfólkið í handlinum hjá Bíbliuselskapinum í San Jose á Costa Rica, fekk ein dag vitjan av manni, sum ynskti at vita, hvussu nógv ein bíblia kostaði.

Tá hann hoyrdi prísin, tók hann peningin fram og legði hann á diskin. Starvsfólkið í handlinum spurdi, um bíblian skuldi pakkast inn.

Tá svaraði maðurin: "Eg skal ikki hava nakra bíbliu. Fyri einum ári síðani var eg inni í hesum handlinum og stjól eina bíbliu. Eingin vildi keypa hana frá mær, og tí byrjaði eg at lesa í henni. Hon broytti fullkomuliga lív mítt. Tí standi eg aftur her í dag og vil gjalda bíbliuna eg stjól"

*Galda hans orð øll tey lívssælu, eymu*
*eisini fátæka syndara meg?*
*Tori eg drekka úr sælunar streymi?*
*Harri tú svarar: Mítt orð er for teg!"*
*Ms.225*

Føroya størsta úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir
Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur
Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni
Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

... sjálvandi til besta prísin !!

FARPACK
Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com

Línubustir og goggar
Hondbundin føroysk línubust
og hondgjørdir goggarar

Verða sendar um alt landið

Bílegging:
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97

Fløttislið (limur í Føroya blindafelag)

# Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum við gávum, telegrammum og uppringingum innanlands og uttanlands gleddu meg á mínum 75 ára degi tann 25. september 2004. Serliga tøkk til børn og abbabørn fyri vitjanir. Og ein serlig heilsan til Finnbjørn.

Kærastu heilsanir
Petur Sofus Juul



*Petur Sofus á seinasta landsfundi hjá fiskimannafelagnum.*

Vit vilja eisini ynskja Petur Sofus tillukku við degnum. Hann hevur verið sóknarformaður hjá FF í Funningi síðan seinast í 60-unum, t.v.s. í gott 35 ár. Petur Sofus er eisini ein av okkara mongu trúføstu álitismonnum. Hann er stórt sæð á hvørjum landsfundi, og stutt kann sigast, at hann er altíð við tí góða orðinum. Tað er júst slíkur menn, sum eru veruliga álitið hjá felagnum, og sum gera tað møguligt hjá felagnum at vera umboðað um alt landið.

Vit vóna at síggja Petur Sofus aftur saman konuni á komandi landsfundi.

FFbladið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Ring um lýsingar á tlf. 31 15 69
ella send eitt fax á 31 87 69
gevur MEIRI fyri MINNI

Vágatunnilin

KOYR BARA

Rokning verður send

Koyr beint fram uttan at steðga! Nú skulu øll eftir somu breyt, tá ið tey koyra gjøgnum gjaldstøðina. Allir bilar uttan kubba verða skrásettir við myndatøku, og eigarin av bilinum fær eina rokning sendandi við postinum. Tú kanst gjalda rokningina við heimabanka/heimagreiðslu, í peningastovni ella á posthúsi. Kubbaskipanin heldur kortini fram sum higartil. Tú kanst eisini innan 3 dagar gjalda á bensinstøðum kring landið. Tá verður eingin rokning send.

Frá 1. november verður gjaldstøðin sjálvvirkandi

Steðga ikki við gjaldsstøðina
Mynd verður tikin av bilinum og skrásett
Tú fært rokning við postinum
Gjald við heimabanka, í peningastovni ella á posthúsi

STATOIL VÁGATUNNILIN Shell

www.sansir.fo

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 329 - 5. november 2004

FFblaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna - Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar
Tlf: 311569

# Minningarhaldið 1. november

Sum vanlig skipaði sjómansheimið í Havn 1. november fyri minningarhaldi fyri teir sum vóru farnir á sjónum. Hetta hevur verið ein føst mannagongd síðan 1958.

Minningarhaldið var kl. 10, og sjómansheimið var nærum fullsett. Tað er føst mannagongd, at løgmaður heldur røðu og nevnir teir, sum eru farnir í árinum. Í ár var ta fyrstu ferð Jóannes Eidesgaard fekk hesa uppgávu. Tað plaga at vera ymiskir prestar, sum eisini hava orðið. Í ár var tað nýggi havnarpresturin Jóhannes Fonsdal. Uppi við minnisvarðan legði løgmaður krans vegna landsstýrið og Føroya fólk.

Um kvøldið var eisini sum vant minningargudstænasta í Havnar Kirkju, har tað var væl av fólki. Her plaga eisini ymiskir prestar at tala. Hesa ferð var tað viðareiðisprestur, Elsa Funding. Aftaná gudstænastuna varð boðið á sjómansheimið til ein drekkamunn. Her var eisini heilt fitt av fólki.

Minningarhald vóru um alt landið, so nógv fólk eru við til at minnast okkara sjófólk. Teir sum eru farnir síðan 1. november 2003 eru:

- Gudmund Isfeldt, Tórshavn, 65 ár. Fórst við bátinum "Hella" 7.januar 2004.
- Jens K Justinussen, Lorvík, 54 ár. Druknaði í Havn 7.februar 2004.
- Hans Oluf Johannessen, Klaksvík, 50 ár. Doyði 1. mars 2004 umborð á "Kvikki".


Løgmaður heldur røðu á sjómansheiminum.


Jóhannes Fonsdal hevði eitt orð.


Tað var nógv fólk á sjómansheiminum.


Tað vóru nógv fólk uppi við minnisvarðan.


Kvinnurnar vóru væl umboðaðar. f.v. Eyðna Djurhuus, Duddan, Anna Sofía (Duddan) Hansen, Gertrud Heinesen, Margreth á Rógvu Niclassen.


Løgmaður hevur lagt krans.


Tveir prestar á sjómansheiminum aftaná gudstænastuna: Elsa Funding, sum talaði í Havnar Kirkju,og Petur Martin Rasmussen.